| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>17. desember 2009 | Blað nr.:<br>8275 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **17. desember 2009** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 252/09-276/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jákup E. Hansen
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**254/09** **<u>2008-3983</u>**

**<u>Fíggjarætlan 2009- eykajáttanir</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

**a.** Við árslok 2008 vóru tilsamans 145.105 tkr. fluttar fram sum ikki brúkt játtan. Upphæddin kann sundurgreinast soleiðis:

| Endamál | Broyting á konto | | Upphædd |
| --- | --- | --- | --- |
| Trivnaðarfyrisitingin | 02 | tkr. | 101 |
| Tekniska fyrisitingin | 03 | - | 900 |
| Vegir og gøtur | 11 | - | -1.590 |
| Umhvørvismál | 12 | - | 688 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | 169 |
| Brennistøðin | 15 | - | 4.790 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | -615 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 1.681 |
| Hests skúli | 20 | - | 23 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -77 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -153 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 43 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -356 |
| Høllin í Kollafirði | 241 | - | 518 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 429 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | -594 |
| Eysturskúlin | 27 | - | 77 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | -108 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | -148 |
| Hoyvíkshøllin | 291 | - | 179 |
| Argja skúli | 30 | - | -146 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skúlin við Løgmannabreyt | 310 | - | 166 |
| Kvøldskúlin | 31 | - | 750 |
| Býarsavnið | 34 | - | 898 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 1.248 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -479 |
| Stadionøkið | 37 | - | 1.125 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | 377 |
| Badmintonhøllin | 39 | - | 152 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | -316 |
| Tilhaldið í Tórsgøtu | 44 | - | 23 |
| Barnaansing | 599 | - | 1.029 |
| Mennandi tiltøk | 60 | - | 390 |
| Gamla Havnin | 60 | - | 497 |
| Vinnuverkætlanir | 60 | - | 267 |
| Nýútveganir | 63 | - | -625 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 1.862 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | -5.987 |
| Nýútvegan av amboðum | 69 | - | 86 |
| Umsiting av bygningum | 82 | - | 2.433 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 2.315 |
| Íløgur | 90 | - | 131.175 |
| Barnaansing | | - | 1.908 |
| Framfluttar játtanir íalt frá 2008 | tkr. | | 145.105 |

**b. Eykajáttanir í 2009 av reguleringskonto:**

| | | Tkr. |
|---|---|---|
| 2008-3983, Valútreiðslur | - | 150 |
| 2009-0997, Reinsaríið | - | 112 |
| 2009-0916, Glyvursvegur kanning | - | 1.000 |
| 2009-1565, Westward Ho | - | 25 |
| 2008-4174. Nordatlanten i Århus | - | 25 |
| 2009-1547, Parkeringsviðurskifti kanning | - | 250 |
| 2003-2371, Søluplás í Vágsbotni | - | 100 |
| 2009-2208, Hølir Fr. Petersensgøta | - | 112 |
| 2007-0649, Kloakk í Skraddaragøtu | - | 102 |
| 2009-2259, Við Múrin | - | 68 |
| 2009-2516, Jólabýur | - | 200 |
| 2009-2517, Ólavsøkuhald | - | 215 |
| 2009-2760, Havnar Fimleikafelag 100 ár | - | 100 |
| 2009-0478, Barnaverndarstovan | - | 302 |
| 2009-2790, Vakstrarráðstevna | - | 150 |
| 2009-2972, Setan av kommunustjóra | - | 300 |
| 2009-0652, Jarðfrøðin í Nólsoy | - | 135 |
| 2009-3158, Jólahald og stevnur | - | 300 |
| 2009-3180 Fugur í gingugøtuni | - | 75 |

Játtað av reguleringskonto íalt tkr. 3.721

c. **Flytingar millum konti:**

| | | |
|---|---|---|
| **2009-0830 Hoyvíkar skúli** | | |
| av konto 20, Skúlin í Hesti | - | -30 |
| av konto 22, Skúlin á Velbastað | - | -50 |
| av konto 33, Felags skúlamál | - | -50 |
| av konto 291, Hoyvíkshøllin | - | -179 |
| av konto 31, Kvøldskúlin | - | -150 |
| á konto 28, Hoyvíkar skúli | - | 459 |
| **2009-0149 Skúlin í Koltri** | | |
| av konto 20, Skúlin í Hesti | - | -25 |
| á konto 201, Skúlin í Koltri | - | 25 |
| **2009-3049 Skúlin í Hesti** | | |
| av konto 201, Skúlin í Koltri | - | -12 |
| á konto 20, Skúlin í Hesti | - | 12 |
| **2009-3024 Venjingarskúlin** | | |
| av konto 35, Býarbókasavnið | - | -410 |
| á konto 26, Venjingarskúlin | - | 410 |
| **2009-3114 Frítíðarskúlin** | | |
| av konto 599, Umleggingar | - | -500 |
| á konto 90, Guli skúli | - | 500 |
| **2009-2424 Barnavernd** | | |
| av konto 40, Studn til sos. Endamál | - | -60 |
| av konto 40, Stuðul móti misnýtslu | - | -95 |
| av konto 40, Døgurðaskipanin | - | -200 |
| av konto 40, Ellisheim onnur | - | -50 |
| av konto 40, Heimavitjunartænastan | - | -250 |
| av konto 40, Eldraráðið | - | -150 |
| av konto 02, Trivnaðarfyrisitingin | - | -650 |
| av konto 599, Umleggingar | - | -500 |
| av konto 599, Stuðulstímar | - | -845 |
| á konto 40, Brúkaragjøld | - | 800 |
| á konto 40, Barnavernd | - | 2.000 |

**Býráðið 17. desember 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**255/09** **<u>2007-2973</u>**

**<u>Agenda 21 í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Agenda 21 er ein arbeiðsætlan fyri burðardyggari menning í 21. øld. Henda arbeiðsætlan var millum annað viðtikin á ST fundinum um umhvørvi og menning, sum var hildin í Brasilia í 1992, har umboð frá umleið 180 londum vóru samlaði.

Kapittul 28 í Agenda 21 heitir á allar heimsins kommunur um at fara í samstarv við íbúgvarnar, felagsskapir og vinnulív á staðnum fyri at menna egnar arbeiðsætlanir um burðardygga menning.

Nevnast kann at Agenda 21 ætlanin, um at seta umhvørivstiltøk í verk, er nevnd bæði í samgonguskjalinum hjá verandi landstýri og í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu í Tórshavnar býráð (sí j. nr. 2007-2973/1 og 2).

Bergmann Finnson frá Agenda Stovuni kemur at greiða frá, hvussu kommunan kann arbeiða við lokal Agenda 21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at umhvørvisdeildin fær litið upp í hendi at gera ítøkiliga AGENDA 21-ætlan, sum skal eggja borgarunum til at taka virknan lut í arbeiðnum fram móti reinum umhvørvi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. oktober 2007:** Bergmann Finnson kunnaði um Agenda 21 í Føroyum. Nevndin samtykti at umsitingin letur gera uppskot til arbeiðsseting og uppskot um stýrisbólk at leggja fyri nevndina aftur til næsta regluliga fund.
- Umsitingin leggur fram uppskot til arbeiðssetning og uppskot um bygnað (j.nr. 2007-2973/5).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við arbeiðssetninginum og uppskotinum um bygnað.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. juni 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og at stýrisbólkurin verður mannaður við miðfyrisitingarstjóranum og einum politiskum umboði fyri minnilutan afturat og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt varð at velja serstaka nevnd, sambært §36 í kommunustýrislógini, og vald vórðu Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Vísandi til málið Yvirlýsing um burðardygga menning í Tórshavnar kommunu, j.nr. 2008-4502, samtykt í býráðnum 29. januar 2009, verður skotið upp, at verðandi arbeiðssetningur í Agenda 21 skjalinum hjá Tórshavnar kommunu, j.nr. 2007-2973/5 verður broyttur til §4 í Yvirlýsingini um burðardygga mennnig:

*Verðandi arbeiðssetningur j.nr. 2007-2973/5:*

- Minka umhvørvisárin
- Burðardygg býarmenning
- Lívføðiligt margfeldi
- Inndraga borgarar og virkir
- Sameining av umhvørvi, ferðslu og øðrum økjum

*Verður broyttur til:*

4. Grein í Yvirlýsing fyri arbeiðið hjá føroysku kommununum fyri burðardyggari menning j.nr. 2008-4502/7:

Vit vilja leggja dent á at:

1. Skapa tilvitan um at neyðugt er at taka umhvørvisatlit í sambandi við alla vørunýtslu og alt vinnuvirksemi,
2. Hugsa vistfrøðina hjá bygdini ella býnum sum eina ringrás,
3. Minka um orkunýtsluna, nýta minni av jarðbundnum (fossilum) orkukeldum og meira av alternativum orkukeldum,
4. Menna byggisamtyktir, serliga í býum og tættbygdum økjum, sum minka um nýtsluna av lendi til grundstykkir og minka um bilferðsluna,
5. Tryggja, at lívfrøðiliga margfeldið, sermerkt landsløg og náttúra verða varðveitt, samstundis sum grundarlag er fyri einum livandi lokalsamfelagi,
6. Vísa á samanhangin ímillum heilsu, umhvørvi og trivnað,
7. Greina hvussu kommunalt virksemi kann skipast, soleiðis at kommunurnar ganga á odda viðvíkjandi orkusparing og minking av skaðiligum árini á umhvørvið,
8. Samstarva við fólki úr øðrum londum og mentanum og á hendan hátt menna altjóða umhvørvissamstarvið,
9. Verja og varðveita mentanarminni og mentanarumhvørvi, sum er partur av siðaarvi og samleika.

Afturat hesum verður mælt til, at nýggj umboð verða vald í stýrisbólkin vísandi til at nýtt valskeið byrjaði í januar 2009.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til:

- at grein 4 í yvirlýsingini fyri arbeiðið hjá føroysku kommununum fyri burðardyggari menning (Agenda 21), verður sett sum arbeiðssetningur fyri stýrisbólkin.

- at stýrisbólkurin verður mannaður av nýggjum og fer til verka.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at velja Elina Lindenskov og Jan Christiansen í stýrisbólkin.

**Býráðið 17. desember 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**256/09** **2009-3006**

**Broyting av orðingum í ásetingum fyri 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við umvæling og útbygging av bygningunum hjá Havnar Arbeiðsmannafelag við Tinghúsvegin, sum Landsverk leigar, arbeiðir umsitingin

við uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri eitt natúrliga avmarkað økið. Økið er avmarkað av Tinghúsvegnum, Bøkjarabrekku, Niels Finsensgøtu og Sverrisgøtu.

Í ásetingunum fyri 1. grundumráði, kap. IV, §2. stk.6, stendur:

Kortini eru gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarka økið. Tó má nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 2,0.

Innan fyri omanfyri nevnda natúrliga avmarka økið, vísir tað seg at nettonýtslustigið sum heild er uml. 2,0. GOrsøkin til hetta er m.a. at nettonýtslustigið fyri Handilkjarnan er uppi á 3,15.

Umsitingin mælir til at nettonýtslustigið fyri økið sum heild verður hækkað frá 2,0 til 3,0.

Hetta kemur ikki at hava nakra ávirkan á verandi bygging í 1. grundumráði, men bert at geva møguleikar til at gera serstakar byggisamtyktir við møguleikum fyri at byggja tættari enn í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ásetingarnar fyri 1. grundumráði, kap. IV, §2. stk.6, í almennu byggisamtyktini verður broyttar frá:

> Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 2,0.

Til:

Kortini eru gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**257/09** **2004-0196**

**Viðvíkjandi upptøkureglunum til dagstovnarnar og kommunalu dagrøktina í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Síðani 1995 hevur kommunan víst til kunngerð um gjaldsreglur frá Almanna-stovuni, tá foreldur hava verið í eftirstøðu. Men tá kommunan yvirtók dagstovn-arnar á sumri 2000, fóru tær reglurnar úr gildi.

Almanna- og heilsumálaráðið er í fer við at endurskoða løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, har eisini spurningur um eftirstøðu av foreldragjaldi verður viðgjørdur.

Umsitingin hevur spurt seg fyri hjá løgfrøðingi og metir hann, at kommunan kann gera sína egnu áseting hesum viðvíkjandi, men samstundis heita á Almanna- og heilsumálaráðið um at fáa sett ásetingina í dagstovnalógina, soleiðis at kommunan hevur eina lóg at vísa til, tá kravt verður eftir peningi, kommunan eigur til góðar hjá foreldrum.

Sambært § 4 stk. 2. í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, skal landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum góðkenna upptøku-reglurnar. Skotið verður tí upp, at reglan um "eftirstøðu" verður sett í upptøkureglurnar og send landsstýrismanninum til góðkenningar.

**Eftirstøða:**
Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta frípláss.

**Tilmæli**:

Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna regluna um eftirstøðu og senda upptøkureglurnar til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 2. mars 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Gunnleyg Durhuus greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hóast reglan um, at eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt ikki má fara upp um 2 mánaðir, varð samtykt á býráðsfundi 17. mars 2005, og góðkend av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í skrivi dagfest 21.04.05, tykist heimild kortini ikki fyri hesi broyting. Almanna- og heilsumálaráðnum hevur nevniliga eftirfylgjandi vent sær til kommununa við boðum um, at kunngerð nr. 6 frá 25 januar 1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt, sum er broytt við

kunngerð nr. 84 frá 7. oktober 1999 er framvegis í gildi. Sambært hesi kunngerð er freistin 3 mánaðir.

Neyðugt er tí at dagføra upptøkureglurnar hesum viðvíkjandi. Samstundis kann høvi nýtast til at nágreina reglurnar í upptøkureglunum um eftirstøðu, upptøkunevnd og um kærur.

Broytingarnar, ið tørvur er á at gera eru:

- Upptøkunevndin í § 9 er at kalla óvirkin. Spurningurin er eisini, um henda skipan ikki er óneyðuga stirvin, tá reglurnar fyri upptøku eru bæði greiðar og einfaldar. Tí kann henda nevndin verða tikin av.
- Tíðin, foreldur kunnu vera í eftirstøðu, eigur at verða broytt úr 2 mánaðum til 3 mánaðir
- Tørvur er á at nágreina, at eftirstøða er øll eftirstøða, t.e. at tað ikki hevur týdning fyri tilboð um ansingarpláss, hvat barn hjá avvarðandi foreldrið/foreldrum, eftirstøðan er íkomin fyri.
- Áseta, at yngri ella onnur systkin eiga ikki at fáa tilboð fyrr enn øll eftirstøða er avklárað.
- Flytur barn millum stovnar v.m., harundir millum sjálvsognarstovnar og kommunalar stovnar, eigur øll eftirstøða verða gjørd upp og avgreidd, áðrenn flutt verður.
- Nágreina, hvat mentamálanevndin er kærumyndugleiki viðvíkjandi.

1)
§ 9 verður strikað.

§§ 10 -14 verða hereftir §§ 9-13

2)
§ 14, ið verður § 13, verður orðað soleiðis:
"Hava foreldur fleiri børn í ansing, gjalda tey fult gjald fyri dýrasta barnið og 75% fyri systkini.

Systkin eru:
1. Biologisk systkin, ið bæði búgva hjá antin faðir ella móður, ið hevur foreldra myndugleikan.

2. Ættleitt systkin, stjúksystkin, sum hava sama bústað sambært fólkayvirlitið.

Fyri at fáa systkinaavsláttur skal barnið búgva í Tórshavnar kommunu.
Búgva foreldrini ikki saman, men hava felags foreldramyndugleika, verður barnið roknað sum systkin, har barnið býr sambært fólkayvirlitinum, óansæð um barnið býr líka leingi hjá báðum foreldrunum."

3)
Sum nýggj § 14 verður sett:

"§14
Eftirstøða
Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin gera av at siga ansingartilboð til foreldrini upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin um frípláss.

Sum eftirstøða verður mett øll eftirstøða, t.e. uttan mun til, fyri hvat barn hjá foreldrunum eftirstøðan er íkomin fyri.

Eru foreldur í eftirstøðu, kunnu onnur ella yngri systkin ikki fáa tilboð um ansingarpláss, fyrr enn eftirstøðan er avgreidd.

Skal barn flyta millum stovnar ella dagrøkt v.m., harundir millum sjálvsognarstovnar og kommunalar stovnar, skal øll eftirstøða verða gjørd upp og avgreidd, áðrenn flytast kann."

4)
§ 15 verður orðað soleiðis:
"Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð kunnu, innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur skrivliga fingið fráboðan um avgerðina, kærast til landsstýrið.

**Tilmæli**
Leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildini mælir til at góðkenna omanfyri nevndu broytingar 1-4 og senda tær til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum til góðkenningar sambært reglunum í § 4, stk. 2, í lógini um dagstovnar og dagrøkt.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti**
Síðani omanfyri nevndu uppskot vóru løgd fyri mentamálanevndina, hevur umsitingin arbeitt við at endurskoða upptøkureglurnar sum heild. Umsitingin er komin til ta niðurstøðu, at tørvur er á at gera niðanfyri nevndu broytingar.

**Broytingarnar, ið tørvur er á at gera eru:**

**§ 1 broytast:**

**At býurin verður býttur í økir, soleiðis at foreldur skriva seg upp í tí øki tey búgva**. Upptøkureglurnar, ið vórðu samtyktar í býráðnum 18. mars 1999, var býurin býttir í 4 økir. Børnini fingu pláss á tí stovni, ið lá tættast við bústaðin. Í november 1998, kærdi foreldrafelagið í Havn kommununa fyri Landsstýrið, um at Tórshavnar kommuna ikki fyrisat bíðilistan til upptøku til dagstovn og dagrøkt samsvarandi galdandi rætt. Sambært svari fá Løgmansskrivstovuni dagfest 08.05.01 um kæruna, verður t.d. víst til, *at út frá einum vanligum líkskaparsetningi er tíðin, ið borgarin hevur bíðað eftir einari kommunalari tænastu ella veiting, sum ikki er til taks fyri allar borgarar í kommununi, við tað at tørvur er á ansingarplássum, eitt tungtvigandi fyrilit, ið altíð skal havast í huga, tá kommunan tekur avgerð um, hvørjir og í hvørjari raðfylgju borgararnir skulu fáa tillutað tænastuna.* Víðari verður sagt í skrivinum um økislistar, *viðvíkjandi økislistunum er at viðmerkja, at Løgmansskrivstovuna er av teirri fatan, at skipanin hjá kommununi við at flyta øll børn á høvuðs – ella uppsamlingslistanum yvir á ein av fýra økislistinum , ið fevna um tað øki, har børnini búgva, og fyri síðani at lata plássið á økislistanum einsamalt gera av, nær barnið fær ansingarpláss, ikki kann sameinast við áður nevnda líkskaparsetning.* Uupptøkureglunum, ið vórðu samtyktar á Býráðsfundi 7. mars 2002, varð staðfest, at kommunan er **eitt** barnaansingarøki.

At uppskot nú er um at fara aftur til gomlu skipanina við økjum, kemst av, at vit hava nøkur dømir um, at foreldur, ið t.d. búgva í Kollafirði ynskja vøggustovu í Havn, við tí úrsliti, at tóm pláss eru í dagrøktini í Kollafirði og bíðilisti er at sleppa í vøggustovu í Havn. Tá farið varð frá økjum, til at Tórshavnar kommuna varð eitt øki, er dagstovnaøkið nógv útbygt og nøktar kommunan nærum tørvin fyri ansing. Tí verður mælt til, at Tórshavnar kommuna verður býtt í 7 økir.

**§ 2 broytast:**

À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í kommununi.

Til - À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í tí økinum í býnum barnið býr.

Verður § 1 broytt, verður eisini neyðugt at broyta §2.

**§ 4 strikast**
§ 4 er soljóðandi: Børnini koma á bíðilista eftir umsóknardegnum t.v.s. dagin, umsóknin er mótikin á býráðsumsitingini. Um fleiri umsóknir eru sama dag, kemur elsta barnið á bíðilistan, síðani næstelsta o.s.fr.
Verður § 6 (5) samtykt, er henda § óneyðug.

**§ 5 broytast:**
Loyva foreldrum, ið eru undir útbúgving uttanlands, sum eitt stutt skifti eru í starvsvenjing ella hava eina ávísa arbeiðsuppgávu at loysa, at fáa børnini ansaði, treytað av, at viðkomandi hevur váttan frá læristovni ella arbeiðsgevara, og at talan er um avmarkað tíðarskeið.

Sambært grein 4 í dagstovnalógini, *kunnu foreldur ella verji at børnunum søkja um dagstovna- ella dagrøktarpláss í tí kommunu, har barnið er skrásett búgvandi. Kommunan kann tó loyva barni pláss, sum ikki er skrásett í kommununi.* Sambært grein 5 í upptøkureglunum hjá Tórshavnar kommunu, skal barnið vera skrásett og búgvandi í kommununi.
Kommunan kann í hesum førum áleggja stovnunum at taka fleiri børn inn, enn teir eru normeraðir til, tó ikki fleiri, enn góðkenningin hjá Arbeiðseftirlitinum loyvir

**§ 6 broytast:**
§ 6 broytast frá, at tá pláss er tøkt, skal fyrsta barnið á bíðilista hava tilboð - til at, tá pláss er tøkt, skal elsta barnið á bíðilista hava tilboð. Tað vil siga, at børnini standa á bíðilista eftir aldri – elsta barnið fyrst.

Orsøkin til at uppskot verður sett fram um at broyta omanfyri nevnda er, at royndir vísa, at nøkur foreldur bíða við at skriva síni børn upp, fyri at fáa útgoldið pening vegna vantandi barnaansing, eisini fáa foreldur, ið flyta til kommununa við stórum vøggustovubørnum, ikki børnini inn, tí tey eru niðarlaga á bíðilistanum.

Harumframt hava foreldur fingið boðið pláss, hóast barnsburðar- hvíldin ikki er av. Umsitingin hevur eisini kannað, hvussu aðrar kommunur taka børn upp, og vísir tað seg, at tær allar flestu donsku kommunurnar taka børn inn eftir aldri. Hetta kann forsvarast, tá hugsað verður um, at tørvurin nærum er nøktaður. Eisini verður lættari hjá umsitingini at geva foreldrum greið boð, um nær tey fáa pláss til barnið.

**§ 9 strikast:**
Upptøkunevndin í § 9 er at kalla óvirkin. Spurningurin er eisini, um henda skipan ikki er óneyðuga stirvin, tá reglurnar fyri upptøku eru bæði greiðar og einfaldar. Tí kann henda nevndin verða tikin av.

**§ 11 ískoyti:**
At skoytt verður uppí § 11, at hava foreldur ikki boðað Snarskivuni frá, at tey koma úr farloyvi ásettu tíð, verður plássið latið næsta barninum á listanum.
Tað vísir seg ferð aftaná ferð, at foreldur gloyma at boða Snarskivuni frá, at tey ikki ynskja plássið aftur. Hetta merkir, at pláss kunnu koma at standa tóm.

**§ 14 eftirstøða:**
Hóast reglan um, at eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt ikki má fara upp um 2 mánaðir, varð samtykt á býráðsfundi 17. mars 2005, og góðkend av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í skrivi dagfest 21.04.05, tykist

heimild kortini ikki fyri hesi broyting. Almanna- og heilsumálaráðið hevur nevniliga eftirfylgjandi vent sær til kommununa við boðum um, at kunngerð nr. 6 frá 25 januar 1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt, sum er broytt við kunngerð nr. 84 frá 7. oktober 1999 er framvegis í gildi. Sambært hesi kunngerð er freistin 3 mánaðir.

**Tíðin, foreldur kunnu vera í eftirstøðu, eigur at verða broytt úr 2 mánaðum til 3 mánaðir Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin gera av at siga ansingartilboð til foreldrini upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin um frípláss.**

Umframt nevndu eftirstøðu, hevði umsitingin eisini uppskot um, at eftirstøða verður mett sum øll eftirstøða, uttan mun til, hvat fyri barn hjá foreldrunum eftirstøðan er íkomin fyri.

Eru foreldur í eftirstøðu, kunnu onnur ella yngri systkin ikki fáa tilboð um ansingarpláss, fyrr enn øll eftirstøða er avgreidd.

Síðani uppskotið varð fyrilagt mentamálanevndini er soljóðandi niðurstøða komin úr Almanna- og heilsumálaráðnum
*Tað er rættur foreldranna at gera av, hvørja skuld teirra inngjøld skulu útlíknað, tá inngjøldini ikki eru nóg stór til at útlíknað alla skuldina til kommununa. Hetta er í tráð við vanligar obligatiónsrættarligar meginreglur. Tá kommunan sjálv ásannar, at eftirstøðan ikki er vegna gjald fyri ansingarpláss hjá barnið, ið nú gongur á stovni, men fyri eftirstøðu fyri ansingarplássið hjá systkjum, ið hava gingið á stovni í 2000 og 2001, ber ikki til at siga stovnsplássið hjá systrini upp við heimild í § 14 í upptøkureglunum.*

**Sostatt ber ikki til at siga systkjum upp á stovni, sum foreldrini hava goldið fyri, hóast tey eru í eftirstøðu fyri eldri systkjum, sum ikki longur eru í ansing**.

**§ 15 broytast**
At landsstýrið er kærumyndugleiki og ikki mentamálanevndin

**At taka støðu til hjá mentamálanevndini**

**1) § 1 er soljóðandi í dag**
§ 1 Kommunan er **eitt** barnaansingarøki, og miðað verður ímóti at hava eitt javnt útboð av dagrøktar-, vøggustovu og barnagarðsplássum í allari kommununi

**Nýggj § 1 verður orðað soleiðis:**
Kommunan er býtt uppí 7 ansingarøkir:
Vesturbýur og Argir
Miðbýur og Eysturbýur
Hoyvík
Kollafjørður
Kaldbak
Nólsoy
Velbastaður

Foreldur kunnu raðfesta ynski til dagstovn í tí økinum tey búgva[1]

**2) § 2 er soljóðandi:**
À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í kommununi.

**Nýggj § 2 verður orðað soleiðis:**
À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í tí økinum í býnum barnið býr.

**3) § 4 er soljóðandi:**
Børnini koma á bíðilista eftir umsóknardegnum t.v.s. dagin, umsóknin er mótikin á býráðsumsitingini. Um fleiri umsóknir eru sama dag, kemur elsta barnið á bíðilistan, síðani næstelsta o.s.fr.

**§ 4 verður strikað**

**4) § 5 er soljóðandi:**
§ 5 Fyri at koma á bíðilista skal barnið vera skrásett búgvandi í kommununi, tó kunnu ættleidd børn koma á bíðilista, tá foreldur, ið ættleiða, kunnu vísa váttan, at teimum er ávíst serstakt barn. Eisini kunnu foreldur, ið hava í hyggju at flyta í

Tórshavnar kommunu, skriva seg upp á bíðilista 6 mánaðir, áðrenn flutt verður í kommununa.

**At leggja afturat §5**
**Harumframt kunnu foreldur, sum eru undir útbúgving ella hava eina ávísa uppgávu at loysa - og búgva uttanlands, fáa børnini ansaði í tveir til seks**

[1] Stovnarnir verða nevndir í umsóknarblaðnum, ið hoyra til økini

**mánaðir, treytað av, at tey hava váttan frá útbúgvingarstaði ella arbeiðsgevara og at talan er um avmarkað tíðarskeið.**

**5)**
**§ 6 er soljóðandi**:
Tá pláss er tókt, skal fyrsta barnið á bíðilista, eftir raðfesting hjá foreldrunum av stovnum ella dagrøktari, hava tilboð.

**Nýggj §6:**
**Tá pláss er tókt, skal elsta barnið á bíðilista, eftir raðfesting hjá foreldrum av stovnum ella dagrøktara hava tilboð.**

**§§ 5-8 verða hereftir §§ 4 – 7**

**6)**
**§ 9 er soljóðandi:**
Upptøkunevnd við trimum umboðum verður sett at taka børn inn á stovn ella dagrøkt. Í upptøkumevndini verða: leiðarin fyri børn og ung, sum formaður, 1 umboð fyri dagstovnarnar og 1 umboð fyri dagrøktina. Upptøkunevndin skal hava 6 regluligar fundir um árið og annars tá børn verða tikin inn.
**§ 9 verður strikað.**

**§§ 10 -15 verða hereftir §§ 8-13**

**7)**
**§ 14 er soljóðandi um eftirstøðu**
Eftirstøða: Um eftirstøða fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis. At kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta fríplás.

**Sum nýggj § 14 verður sett:**

**"§14**
**Eftirstøða**
**Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin gera av at siga ansingartilboð til foreldrini upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin um fríplás.**

**8)**
**§ 15 er soljóðandi:**
Mentamálanevndin er kærunevnd viðvíkjandi avgerðum hjá upptøk-evndina.

**§ 15 verður orðað soleiðis:**

**Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð kunnu, innan 4 vikur eftir, at kærarin skrivliga hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til landsstýrið.**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at góðkenna omanfyri nevndu broytingar og senda tær til landsstýrismannin í mentamálum til góðkenningar sambært reglunum í § 4, stk. 2, í lógini um dagstovnar og dagrøkt.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2009:** Málið varð umrøtt og umsitingin arbeiðir víðari við málinum á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum og gjørt nakrar broytingar.

**Broytingarnar, ið tørvur er á at gera eru:**

**§ 1 broytast:**
At býurin verður býttur í økir, soleiðis at foreldur skriva seg upp í tí øki tey búgva. Upptøkureglurnar, ið vórðu samtyktar í býráðnum 18. mars 1999, var býurin býttir í 4 økir. Børnini fingu pláss á tí stovni, ið lá tættast við bústaðin. Í november 1998, kærdi foreldrafelagið í Havn kommununa fyri Landsstýrið, um at Tórshavnar kommuna ikki fyrisat bíðilistan til upptøku til dagstovn og dagrøkt samsvarandi galdandi rætt. Sambært svari fá Løgmansskrivstovuni dagfest 08.05.01 um kæruna, verður t.d. víst til, *at út frá einum vanligum líkskaparsetningi er tíðin, ið borgarin hevur bíðað eftir einari kommunalari tænastu ella veiting, sum ikki er til taks fyri allar borgarar í kommununi, við tað at tørvur er á ansingarplássum, eitt tungtvigandi fyrilit, ið altíð skal havast í huga, tá kommunan tekur avgerð um, hvørjir og í hvørjari raðfylgju borgararnir skulu fáa tillutað tænastuna.* Víðari verður sagt í skrivinum um økislistar, *viðvíkjandi økislistunum er at viðmerkja, at Løgmansskrivstovuna er av teirri fatan, at skipanin hjá kommununi við at flyta øll børn á høvuðs – ella uppsamlingslistanum yvir á ein av fýra økislistinum , ið fevna um tað øki, har børnini búgva, og fyri síðani at lata plássið á økislistanum einsamalt gera av, nær barnið fær ansingarpláss, ikki kann sameinast við áður nevnda líkskaparsetning.* Uupptøkureglunum, ið vórðu samtyktar á Býráðsfundi 7. mars 2002, varð staðfest, at kommunan er **eitt** barnaansingarøki.

At uppskot nú er um at fara aftur til gomlu skipanina við økjum, kemst av, at vit hava nøkur dømir um, at foreldur, ið t.d. búgva í Kollafirði ynskja vøggustovu í Havn, við tí úrsliti, at tóm pláss eru í dagrøktini í Kollafirði og bíðilisti er at sleppa í vøggustovu í Havn. Tá farið varð frá økjum, til at Tórshavnar kommuna varð eitt øki, er dagstovnaøkið nógv útbygt og nøktar kommunan nærum tørvin fyri ansing. Tí verður mælt til, at Tórshavnar kommuna verður býtt í 7 økir.

**§ 2 broytast:**
À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í kommununi.

Til - À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í tí økinum í býnum barnið býr.
Verður § 1 broytt, verður eisini neyðugt at broyta §2.

**§ 4 strikast**
§ 4 er soljóðandi: Børnini koma á bíðilista eftir umsóknardegnum t.v.s. dagin, umsóknin er mótikin á býráðsumsitingini. Um fleiri umsóknir eru sama dag, kemur elsta barnið á bíðilistan, síðani næstelsta o.s.fr.
Verður § 6 (5) samtykt, er henda § óneyðug.

**§ 5 broytast:**
Loyva foreldrum, ið eru undir útbúgving uttanlands, sum eitt stutt skifti eru í starvsvenjing ella hava eina ávísa arbeiðsuppgávu at loysa, at fáa børnini ansaði, treytað av, at viðkomandi hevur váttan frá læristovni ella arbeiðsgevara, og at talan er um avmarkað tíðarskeið.

Sambært grein 4 í dagstovnalógini, *kunnu foreldur ella verji at børnunum søkja um dagstovna- ella dagrøktarpláss í tí kommunu, har barnið er skrásett búgvandi. Kommunan kann tó loyva barni pláss, sum ikki er skrásett í kommununi.* Sambært grein 5 í upptøkureglunum hjá Tórshavnar kommunu, skal barnið vera skrásett og búgvandi í kommununi.

Kommunan kann í hesum førum áleggja stovnunum at taka fleiri børn inn, enn teir eru normeraðir til, tó ikki fleiri, enn góðkenningin hjá Arbeiðseftirlitinum loyvir

**§ 6 broytast:**

§ 6 broytast frá, at tá pláss er tøkt, skal fyrsta barnið á bíðilista hava tilboð - til at, tá pláss er tøkt, skal elsta barnið á bíðilista hava tilboð. Tað vil siga, at børnini standa á bíðilista eftir aldri – elsta barnið fyrst.
Orsøkin til at uppskot verður sett fram um at broyta omanfyri nevnda er, at royndir vísa, at nøkur foreldur bíða við at skriva síni børn upp, fyri at fáa útgoldið pening vegna vantandi barnaansing, eisini fáa foreldur, ið flyta til kommununa við stórum vøggustovubørnum, ikki børnini inn, tí tey eru niðarlaga á bíðilistanum. Harumframt hava foreldur fingið boðið pláss, hóast barnsburðar- hvíldin ikki er av. Umsitingin hevur eisini kannað, hvussu aðrar kommunur taka børn upp, og vísir tað seg, at tær allar flestu donsku kommunurnar taka børn inn eftir aldri. Hetta kann forsvarast, tá hugsað verður um, at tørvurin nærum er nøktaður. Eisini verður lættari hjá umsitingini at geva foreldrum greið boð, um nær tey fáa pláss til barnið.

**§ 9 strikast:**
Upptøkunevndin í § 9 er at kalla óvirkin. Spurningurin er eisini, um henda skipan ikki er óneyðuga stirvin, tá reglurnar fyri upptøku eru bæði greiðar og einfaldar. Tí kann henda nevndin verða tikin av.

**§ 11 ískoyti:**

At skoytt verður uppí § 11, at hava foreldur ikki boðað Snarskivuni frá, at tey koma úr farloyvi ásettu tíð, verður plássið latið næsta barninum á listanum.
Tað vísir seg ferð aftaná ferð, at foreldur gloyma at boða Snarskivuni frá, at tey ikki ynskja plássið aftur. Hetta merkir, at pláss kunnu koma at standa tóm.

**§ 14 eftirstøða:**
Hóast reglan um, at eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt ikki má fara upp um 2 mánaðir, varð samtykt á býráðsfundi 17. mars 2005, og góðkend av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í skrivi dagfest 21.04.05, tykist heimild kortini ikki fyri hesi broyting. Almanna- og heilsumálaráðið hevur nevniliga eftirfylgjandi vent sær til kommununa við boðum um, at kunngerð nr. 6 frá 25 januar 1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt, sum er broytt við kunngerð nr. 84 frá 7. oktober 1999 er framvegis í gildi. Sambært hesi kunngerð er freistin 3 mánaðir.

**Tíðin, foreldur kunnu vera í eftirstøðu, eigur at verða broytt úr 2 mánaðum til 3 mánaðir Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin gera av at siga ansingartilboð til foreldrini upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin um frípláss.**

Umframt nevndu eftirstøðu, hevði umsitingin eisini uppskot um, at eftirstøða verður mett sum øll eftirstøða, uttan mun til, hvat fyri barn hjá foreldrunum eftirstøðan er íkomin fyri.

Eru foreldur í eftirstøðu, kunnu onnur ella yngri systkin ikki fáa tilboð um ansingarpláss, fyrr enn øll eftirstøða er avgreidd.

Síðani uppskotið varð fyrilagt mentamálanevndini er soljóðandi niðurstøða komin úr Almanna- og heilsumálaráðnum

*Tað er rættur foreldranna at gera av, hvørja skuld teirra inngjøld skulu útlíknað, tá inngjøldini ikki eru nóg stór til at útlíknað alla skuldina til kommununa. Hetta er í tráð við vanligar obligatiónsrættarligar meginreglur. Tá kommunan sjálv ásannar, at eftirstøðan ikki er vegna gjald fyri ansingarpláss hjá barnið, ið nú gongur á stovni, men fyri eftirstøðu fyri ansingarplássið hjá systkjum, ið hava gingið á stovni í 2000 og 2001, ber ikki til at siga stovnsplássið hjá systrini upp við heimild í § 14 í upptøkureglunum.*

**Sostatt ber ikki til at siga systkjum upp á stovni, sum foreldrini hava goldið fyri, hóast tey eru í eftirstøðu fyri eldri systkjum, sum ikki longur eru í ansing**.

**§ 15 broytast**
At landsstýrið er kærumyndugleiki og ikki mentamálanevndin

**At taka støðu til hjá mentamálanevndini**

**1) § 1 er soljóðandi í dag**
§ 1 Kommunan er **eitt** barnaansingarøki, og miðað verður ímóti at hava eitt javnt útboð av dagrøktar-, vøggustovu og barnagarðsplássum í allari kommununi

**Nýggj § 1 verður orðað soleiðis:**
Kommunan er býtt uppí 7 ansingarøkir:
Vesturbýur og Argir
Miðbýur og Eysturbýur
Hoyvík
Kollafjørður
Kaldbak
Nólsoy
Velbastaður
Foreldur kunnu raðfesta ynski til dagstovn í tí økinum tey búgva[2]

**2) § 2 er soljóðandi:**
À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í kommununi.

**Nýggj § 2 verður orðað soleiðis:**
À umsóknarblaðnum til barnaansing skal raðfestast ynski til ansingarstað í tí økinum í býnum barnið býr.

**3) § 4 er soljóðandi:**
Børnini koma á bíðilista eftir umsóknardegnum t.v.s. dagin, umsóknin er mótikin á býráðsumsitingini. Um fleiri umsóknir eru sama dag, kemur elsta barnið á bíðilistan, síðani næstelsta o.s.fr.

**§ 4 verður strikað**

**4) § 5 er soljóðandi:**
§ 5 Fyri at koma á bíðilista skal barnið vera skrásett búgvandi í kommununi, tó kunnu ættleidd børn koma á bíðilista, tá foreldur, ið ættleiða, kunnu vísa váttan, at teimum er ávíst serstakt barn. Eisini kunnu foreldur, ið hava í hyggju at flyta í Tórshavnar kommunu, skriva seg upp á bíðilista 6 mánaðir, áðrenn flutt verður í kommununa.

**At leggja afturat §5**

Harumframt kunnu foreldur, sum eru undir útbúgving ella hava eina ávísa uppgávu at loysa - og búgva uttanlands, fáa børnini ansaði í tveir til seks mánaðir, treytað

[2] Stovnarnir verða nevndir í umsóknarblaðnum, ið hoyra til økini

av, at tey hava váttan frá útbúgvingarstaði ella arbeiðsgevara og at talan er um avmarkað tíðarskeið.

**5)**
**§ 6 er soljóðandi**:
Tá pláss er tókt, skal fyrsta barnið á bíðilista, eftir raðfesting hjá foreldrunum av stovnum ella dagrøktari, hava tilboð.

**Nýggj §6:**
Tá pláss er tókt, skal elsta barnið á bíðilista, eftir raðfesting hjá foreldrum av stovnum ella dagrøktara hava tilboð.

**§§ 5-8 verða hereftir §§ 4 – 7**

**6)**
**§ 9 er soljóðandi:**
Upptøkunevnd við trimum umboðum verður sett at taka børn inn á stovn ella dagrøkt. Í upptøkumevndini verða: leiðarin fyri børn og ung, sum formaður, 1 umboð fyri dagstovnarnar og 1 umboð fyri dagrøktina. Upptøkunevndin skal hava 6 regluligar fundir um árið og annars tá børn verða tikin inn.
**§ 9 verður strikað.**

**§§ 10 -15 verða hereftir §§ 8-13**

**Ískoyti í gomlu grein 11**
Hava foreldrini ikki boðað Snarskivuni frá, at tey koma úr farloyvi ásettu tíð, verður plássið latið næsta barninum á listanum.

**7)**
**§ 14 er soljóðandi um eftirstøðu**
Eftirstøða: Um eftirstøða fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis. At kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta frípláss.

**Sum nýggj § 14 verður sett:**

**"§14**
**Eftirstøða**
Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin gera av at siga ansingartilboð til foreldrini upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin um frípláss.

**8)**
**§ 15 er soljóðandi:**
Mentamálanevndin er kærunevnd viðvíkjandi avgerðum hjá upptøk-evndini.

**§ 15 verður orðað soleiðis:**
Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð kunnu, innan 4 vikur eftir, at kærarin skrivliga hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til landsstýrið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at góðkenna omanfyri nevndu broytingar og senda tær til landsstýrismannin í mentamálum til góðkenningar sambært reglunum í § 4, stk. 2, í lógini um dagstovnar og dagrøkt.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Uppiskoyti:**
Eftir at mentamálanevndin góðkendi at gera ymiskar broytingar í upptøkureglunum 11. november 2009, hevur Barna - og Ungdómsdeildin fingið áheitan frá Roknskapardeildini um at varðveita §14, *um at eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta frípláss.*

Umsitingin hevur aftur vent sær til Almannaráðið við fyrispurningi um kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt frá 25. januar 1995 er í gildið. Svarið frá Almannaráðnum er, at kunngerðin er farin úr gildi og kommunan avgerð sjálv tíðarfreistina fyri uppsøgn.

**Tilmæli:** Varðveita § 14 ( hereftir § 12)
*Eftirstøða: Um eftirstøða fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis. At kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta frípláss.*

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**258/09** **2004-0558**

**Mál um 10. flokk**

Á fundi í mentamálanevndini 8. februar 2006 samtykti nevndin at heita á skúlastjórarnar í framhaldsskúlunum í Tórshavnar kommunu at velja fimm fólk í ein arbeiðsbólk at viðgera 10. flokk.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soleiðis orðaður:

*Arbeiðsbólkurin verður biðin at koma við uppskoti, hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga í framtíðini, og um hann skal verða skipaður í eina eind ella fleiri eindir.*

Heitt varð á arbeiðsbólkin at lata mentamálanevndini uppskotið í seinasta lagi 15. mai 2007.

**Í arbeiðsbólkin vórðu tilnevnd:**
Eyðdis Eidesgaard, formaður, umboð fyri skúlastjórarnar
Jacob Thomsen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla
Símun Joensen, lærari í Eysturskúlanum
Birgir Mortensen, lestrarvegleiðari í Handilsskúlanum í Havn, umboð fyri miðnámskúlarnar
Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip, umboð fyri vinnulívið

Høgni Joensen, skrivari, umboð fyri býráðið

Álitið um 10. flokk verður framlagt á fundinum.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Høgni Joensen, skrivari í arbeiðsbólkinum, legði álitið fram.

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin er samdur um, at neyðugt verður at tillaga 10. flokk til nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðingar, og at hugburðurin um 10. flokk skal broytast frá at vera endin á fólkaskúlanum til at verða byrjanin til eina útbúgving.

Í 10. flokki skulu næmingar uppliva eitt øðrvísi skúlaár, har hann/hon hevur ávirkan, setur saman og fullførir sítt skúlaár. Er virkin í einum dynamiskum ungdóms- og útbúgvingarumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað fakliga og at vera við at taka avgerðir undir felags ábyrgd, har álit og virðing eru lyklaorð.

Men arbeiðsbólkurin er ikki fullsamdur um eitt felags tilmæli. Annað tilmæli er tí frá einum meiriluta: Eyðdis Eidesgaard, Símuni Joensen, Joel undir Leitinum, Birgiri Mortensen og Høgna Joensen og hitt frá einum minniluta: Jákupi Thomsen.

Meirilutin heldur, at í Tórshavnar kommunu skulu allir 10. floks næmingar verða savnaðir í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúlaár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnar undir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

10. floksdepilin skal *ikki verða partur* av einum øðrum skúla, men verður ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Neyðugt verður at seta ein skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, eitt skrivstovufólk og uml. 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. floksdeplinum. Væntast skal, at tveir lærarar eisini hava útbúgving sum lestrarvegleiðarar. Hinir lærararnir skulu í høvuðsheitum tryggja, at næmingarnir verða undirvístir í lærugreinum og breytum.

Minnilutin mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir. Onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum um 10. flokk**

**Meirilutatilmæli**
Eyðdis Eidesgaard, Símun Joensen, Joel undir Leitinum, Birgir Mortensen og Høgni Joensen.

**Skúlaeindin**
Meirilutin í arbeiðsbólkinum mælir til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil frá skúlaárinum 2008/2009 við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

Mælt verður eisini til, at 10. floksdepilin fyribils verður í e-lonini í Eysturskúlanum, men við framtíðini í huga, eigur at verða miðað eftir at byggja ein nýggjan 10. floksdepil í Marknagili.

**Lærarar**
Lærarar, sum eru hugaðir at undirvísa í 10. floksdeplinum, skulu hava møguleika at søkja um farloyvi úr skúlanum, har teir eru í føstum starvi. Farloyvi skal í minsta lagi verða játtað í 2 ár.

**Skipanin**
Hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga, mælir arbeiðsbólkurin til at varðveita breytatilboðini og starvslæruna. Temalestur og brúgvasmíð skal eisini standa næmingunum í boði. Brúgvasmíð skulu verða skipað formliga.

Føroyskt, enskt og støddfrøði verða kravdar lærugreinir. Danskt, týskt, alisfrøði, evnafrøði, átrúnaður (religión), samtíð, lívfrøði og landalæra verða vallærugreinir. Hetta krevur lógarbroyting.

Tveir tímar um vikuna verða settir av til “floksins tíma”, har næmingurin m.a. fær høvi at hitta sín kontaktlærara ella arbeiða við síni verkætlan. Kontaktlærarin hevur

ábyrgd av 12-15 næmingum. Flokslæraraskipanin verður tikin av, tí næmingarnir verða undirvístir í bólkum heldur enn í flokkum.

Tað skal verða tvungin uppmøting og skylda at lata inn skrivligar uppgávur.

Næmingunum eigur at standa í boði at taka ella gera fráfaringarroynd fólkaskúlans betri, t.e. 9. flokkur, og taka víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans, t.e. 10. flokkur í føroyskum, donskum, enskum, týskum, støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði.

**Minnilutatilmæli**
Jákup Thomsen.

Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir.

Grundgevingin er, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir ikki verða miðsavnaðir í eina eftir føroyskum viðurskiftum ov stóra eind, tí tá er vandi fyri, at menningin og fjølbroytnið í skipanini ikki verða tryggjað nóg væl.

Við tveimum skúlaeindum, ið ikki eru ov stórar, verður fakliga og sosiala samveran ímillum næmingar og lærarar betur tryggjað, og tískil er lærarin betur førur fyri at hjálpa tí einstaka næminginum. Víst verður eisini á, at tað er týdningarmikið fyri menningina at hava tvær eindir, sum kappast um at geva næmingunum tey bestu tilboðini.

Minnilutin mælir til, at onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og teir í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja at fara í. Annars tekur minnilutin í høvuðsheitum undir við uppskotinum, hvussu undirvísingin í framtíðini verður skipað, og at skúlaeindirnar framvegis samstarva um breytatilboðini.

**Tilmæli frá trivnaðarfyrisitingini**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum um at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil í e-lonini á Eysturskúlanum við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

**Grundgeving:**
Vísandi til álitið meta trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin, at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði.

Í álitinum verður staðfest, at tað í dag er ein stórur trupulleiki at fáa lærugreinir lisnar, tí næmingagrundarlagið er ov lítið. At skipa 10. flokkarnar í tvær eindir broytir lítið upp á hetta.

Endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skal kunnu seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytartilboð.

Í skúlaárinum 2006/2007 góvust nærum ¼ av næmingunum í 10. flokki, tað svarar til tveir heilar flokkar. Hetta er dýrt fyri kommununa, fyri landið og ikki minst menniskjaliga fyri einstaka næmingin.

Skulu vit megna at broyta hugburðin til, at 10 flokkur skal verða byrjanin til eina útbúgving heldur enn endin á fólkaskúlanum, krevst nýhugsan á skúlaøkinum. Skal tað eydnast at skipa eitt kveikjandi læru- og ungdómsumhvørvi fyri næmingarnar í 10. flokki og byggja brúgvar til aðrar útbúgvingarstovnar og vinnulívið, verður neyðugt at broyta verandi skúlabygnað, soleiðis at 10. skúlaárið verður ein sjálvstøðug skúlaeind.

Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata hendan leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10. flokseind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.

Hølisliga letur tað seg gera at skipa 10. flokk í eina sjálvstøðuga eind í e-lonini í Eysturskúlanum. Har eru góð undirvísingarhøli, serstovur, bókasavn o.a. Fortreytir, sum gera, at møguleikar eru at skipa eitt gott og mennandi umhvørvi hjá bæði næmingum og lærarum.

Í Tórshavnar Kommunuskúla eru sum er trongir hølisk armar. Tí ber illa til at ímynda sær, at tað fer at bera til at skapa nóg góðar og spennandi umstøður til enn fleiri næmingar.

**Mentamálanevndin 23. oktober 2007:** Málið umrøtt og útsett til ein seinni fund.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Tikið av skrá.

***Uppískoyti:***
Týsdagin 29. januar 2008 høvdu tey ellivu skúlastýrini í Tórshavnar kommunu felagsfund um álitið *"10. flokkur – ein øðrvísi skúli"*, ið arbeiðsbólkur á heysti 2007 handaði mentamálanevndini.

Undan fundinum høvdu skúlastýrislimir, býráðslimir og onnur fingið álitið at lesa ígjøgnum.

Eftir framløguni frá arbeiðsbólkinum var orðaskifti um álitið, og fingu skúlastýrini fjúrtan dagar at ummæla og viðgera tilmælini í álitinum og koma aftur til arbeiðsbólkin við sínum tilmælum og viðmerkingum.

Tíggju skúlastýri hava gjørt viðmerkingar til álitið, og eru tey øll samd um at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum, sum mælir til at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við skúlastýrunum at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eysturskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

**Mentamálanevndin 5. mars 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Inga Dahl, samtykti at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum um at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eysturskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, tó soleiðis at byrjað verður frá skúlaárinum 2010/2011 at rokna.

**Býráðið 27. mars 2008:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá mentamálanevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Leivur Hansen og Halla Samuelsen

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 5. november 2009:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at beina málið í fíggjarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Rúni M. Djurhuus, Levi Mørk, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Halla Samuelsen, Levi Mørk, Rúni M. Djurhuus, Maria Hammer Olsen og Annfinn Brekkstein viðmerktu, at tey ynskja, at málið verður lagt fyri býráðið aftur 17. desember 2009.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Tekniski stjórin greiddi frá málinum. Málið var umrøtt og verður tikið upp aftur.

**Ískoyti**
Fíggjarnevndin hevur heitt á umsitingina um at lýsa, hvørjir møguleikar eru at hýsa 10. flokki í kommunuskúlanum við støði í heildarætlanini sum er gjørd fyri skúlan, og hvat hetta fer at hava við sær av eyka útbygging og útreiðslum. Eisini er umsitingin biðin um at lýsa hetta í mun til verandi ætlan og karmarnar 10. flokkur fær í Eysturskúlanum.

Verandi ætlan og umstøður í Eysturskúlanum
Eitt av høvuðsendamálinum við at hava eina 10. floks eind er at víðka um valmøguleikarnar hjá næmingunum, soleiðis at teir meira enn áður skulu kunna seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða og gjøgnumføra nøktandi lærugreina- og breytatilboð.

10. flokkarnir fara at halda til í e-lonini í Eysturskúlanum, og greiður skilnaður verður millum teir og restina av skúlanum. Umstøðurnar í skúlanum eru góðar, pláss er fyri 720 næmingum í 30 skúlastovum, í dag ganga 440 næmingar í 21 í skúlastovum. Undirvísingarhølini eru góð, og tað er galdandi fyri bæði serhøli og vanligar skúlastovur. Við miðhøllini í e-lonini eru góðir møguleikar fyri sjálvstøðugum lærings- og sosialum tiltøkum, soleiðis at 10. flokkur hevur sítt egna umhvørvi – fakliga og sosialt.

Ein persónur í leiðsluni í Eysturskúlanum fer at taka sær av leiðsluni í 10. flokseindini burturav.

Lærararnir hjá 10. flokki verða settir í Eysturskúlanum, men fara at starvast í 10. flokseindini burturav. Tó kann í einstøkum førum henda, at neyðugt verður at "læna" lærarar til okkurt ávíst evni ella onkra serliga lærugrein, sum føstu 10. floks lærararnir ikki kunnu undirvísa í.

Hølisumstøður í Kommunuskúlanum:
Hølisviðurskiftini í Kommunuskúlanum hava í longri tíð ikki verið nøktandi, sæð í mun til tey krøv sum í dag verða sett til hølisumstøður - námsfrøðilig krøv, inniklima, næmingaumstøður o.s.fr. Eisini eru gjørdar støðulýsingar í 2005, sum vísa á umfatandi tørv á viðlíkahaldsarbeiði av skúlabygningunum. Talan er um viðlíkahaldstørv á fleiri 10-tals milliónir kr.

Eisini er av avvarðandi myndugleikum víst á, at inniklima- og brunaviðurskifti krevja ábøtur, og at ov nógvir persónar eru í mun til støddina á skúlanum.

Í 2007 gjørdist neyðugt at fara undir eina størri umvæling av Gamla Realskúlanum, og avgjørdi býráðið tá at gevast við at nýta Gamla Realskúlan til undirvísingarbrúk, av tí at hesin gamli bygningurin ikki longur varð mettur hóskandi til undirvísingarbrúk. Í staðin varð avgjørt at seta bygningin í stand at nýta til skrivstovur til umsiting skúlans, heilsufrøðing, lestrarvegleiðig v.m., og til felagshølir til lærarar. Samstundis gjørdist neyðugt at seta 4 vanligar fyribils skúlastovur upp aftanfyri Sjónleikarahúsið, umframt tvær fakstovur í garðinum hjá Frk. Cohr. Hesar fyribils skúlastovur fingu upprunaliga fyribils byggiloyvi fyri 2 ár, sum er longt fyri 2 ár afturat.

Um støddina á skúlastovum í høvuðsbygningum í Kommunuskúlanum er at siga, at hesar eru rættiliga smáar, samanborið við støddina á skúlastovum sambært nýggjastu krøvunum hjá Mentamáláráðnum. Flestu teirra liggja millum 38 og 49 m². Til samanberingar eru skúlastovunar í teimum báðum nýggjastu skúlunum, sum byggja á nútíðar krøv – t.e. Skúlin við Løgmannabreyt og á Hamrinum á Argjum – ávikavist 70 og 55 m², umframt bólkarúm.

Heildarætlan fyri dagføring av Kommunuskúlanum:
Í 2008 samtykti býráðið at biðja Arkitektavirkið Árni Winther um at gera eina heildarætlan fyri dagføring av Kommunuskúlanum, sum kundi leggjast soleiðis til rættis, at hon kundi gerast í stigum. Við hesi dagføringarætlan verður skúlin mentur til eitt støði, ið kann samanberast við aðrar dagførdar skúlar og nýggju skúlarnar í kommununi. Ásannað varð, at heildarætlanin mátti fevna um dagføring av skúlanum, og ikki bert um byggitøkniligar ábøtur, fyri at næmingar og starvsfólk fáa tíðarhóskandi umstøður at virkað undir. Henda ætlan varð gjørd í neyvum samstarvi millum leiðsluna í Kommunuskúlanum, skúlastýrið, umboð fyri lærarar og kommunalu fyrisitingina.

Býráðið hevði tá avgjørt at savna allar 10. flokkarnar í Eysturskúlanum. Hædd er tí ikki tikin fyri, at Kommunuskúlin skal hýsa 10. flokki, í samband við heildar-/dagføringarætlanina fyri skúlan.

Ein av fleiri týðandi fortreytum fyri heildarætlanini er, at mentamálanevnd kommununar hevur samtykt, at næmingaumstøðurnar í fólkaskúlunum sum heild í kommununi skulu verða á hóskandi støði – herundir undirvísingarhøli til nútímans undirvísingarhættir, umstøður hjá næmingum at eta, námsfrøðiligur tænastudepil, v.m. Hetta er tikið við í heildarætlanina.

Niðurstøðan hjá Arkitektavirkinum Árni Winther viðv. heildarætlanini er, at tað ber til at røkka endamálinum um dagføring av Kommunuskúlanum, um roknað verður við at skúlin skal hýsa 22 flokkum. Hetta svarar til 2 spor frá 1. til 7. flokk, og 4 spor í 8. og 9. flokki við framhaldsnæmingunum úr Santa Frans Skúla og Kommunuskúlanum. Hetta kann gerast við høvuðsumvæling, umbygging, tilbygging og nýbygging. Talan er sostatt um munandi ábøtur fyri at lúka námsfrøðiligu og byggitøkniligu krøvini við atliti til trygd, haldgóðsku og inniklima.

Útbyggingarmøguleikar sambært byggisamtyktini:
Ein avgerandi spurningur í sambandi við dagføring av skúlanum sambært heildarætlanini hevur verið, um møguligt er við útbyggingum, sambært galdandi ásetingum í byggisamtyktini. Økið liggur í 2. grundumráði. Útrokningar eru gjørdar sum vísa, at við fyriliggjandi uppskotið til heildarætlan verður byggistigið 0,48 har mest loyvda byggistig er 0,5, og at nettonýtslustigið verður 0,99 har mest loyvda nettonýtslustig er 1,0. Sostatt ber til, við serstakari byggisamtykt sambært kap IV, §3, stk. 6 í almennu byggisamtyktini, at seta í verk hesa heildarætlanina, soleiðis sum hon fyriliggur.

Hinvegin staðfesta metingar hjá ráðgevum kommununar, at um heildarætlanin skal víðkast til eisini at hýsa 80-100 10. floks næmingum, gerst neyðugt við eini munandi víðkan av skúlanum, sum viðførir at byggistig og nettonýtslustig fara langt útum tað sum byggisamtyktin loyvir (uml. 20%). Byggistigið gerst tá uml. 0,6 og nettonýtslustigið gerst uml. 1,20.

Fíggjarlig viðurskifti:
Ráðgevar kommununar hava gjørt kostnaðarmetingingar fyri niðanfyristandandi 3 framtíðarmyndir:

1. *Bert byggitøkniligar ábøtur:*
   Við bert at fremja ábøturnar sambært støðulýsingini frá 2005, eru hesar av UP Verkfrøði mettar til umleið kr. 35 mió. í 2005-prísum. Við hesum verður skúlin ikki á nakran hátt dagførdur, men er talan bert um ábøtur av byggitøkniligum slag. Pláss er ikki fyri 10. flokki í verandi bygningum, í dag hevur skúlin 4 fyribils skúlastovur og 2 fyribils fakstovur; og tí verður heldur ikki pláss fyri 10. flokki við hesum stigi.

2. *Byggitøknilig og námsfrøðilig dagføring sambært heildarætlan:*
   Við at fremja heildarætlanina (1. til 9. flokk) sambært uppskotinum hjá Arkitektavirkinum Árni Winther, er henda mett at kosta uml. 90. mió. Henda ætlan umfatar eina fulla dagføring av skúlanum, og fevnir sostatt um neyðugar ábøtur av byggitøkniligum slag, umframt krøv til broytta innrætting og tillaging til broytt myndugleikakrøv og virksemiskrøv.

3. *Víðkan av heildarætlan við hølum til 10. floks depil eisini:*
   Um heildarætlanin skal víðkast til eisini at fevna um hølir til uml. 80-100 10. floks næmingar, viðførir hetta sambært Arkitektavirkinum Árni Winther eina meiríløgu á kr. 18 til 22 mió. afturat teimum umleið kr. 90 mió., sum heildarætlanini er mett at kosta. Harafturat kemur, at sambært verandi byggisamtykt fyri økið ber hetta ikki til.

Aðrar hølistengdar avleiðingar og viðmerkingar:
Aðrar avleiðingar av at broyta skúlabygnaðin til at hava tveir 10. floks deplar í kommununi, harav ein í Kommunuskúlanum, ið her skulu nevnast eru:

a) Persónsbelastningurin í Kommunuskúlanum verður framhaldandi ov stórur. Sambært SMJ, ráðgevandi verkfrøðingar, er sera ivasamt, um tað ber til at loysa inniklimatrupuleikarnar, um ikki persónsbelastningurin verður minkaður í mun til tað, hann er í dag.
b) I Eysturskúlanum er pláss fyri 720 næmingum í 30 skúlastovum, í dag ganga 440 næmingar í 21 í skúlastovum. Nøktandi høli eru klárgjørd og standa tøk til at savna allar 10. floks næmingarnar, sambært tilmælinum í 10. floks álitinum og avgerð býráðsins í 2007.
c) Um 10-flokkarnir skulu savnast í tveimum ella fleiri deplum, eru aðrir skúlar enn Kommunuskúlin meira hóskandi til hetta endamál – herundir nýggjastu skúlarnir, tí har er betur møguleiki at byggja út, og betur næminga- og starvsfólkaumstøður sum heild.

**Tilmæli**
Vísandi til,

1. <u>**at**</u> ætlanin um at savna 10. flokk í eina eind er í samsvari við "Álit um nýggja fólkaskúlalóg" frá 1996,
2. <u>**at**</u> býráðið 27. mars 2008, einmælt samtykti bygnaðarligu broytingarnar fyri 10. flokkarnar, við støði í áliti gjørt av óheftum fakfólki, sum skúlastjórarnar í býnum hava valt til uppgávuna
3. <u>**at**</u> slík skipan er roynd við hepnari hond aðrastaðni,
4. <u>**at**</u> nýggju skúlarnir í kommununi eru og verða bygdir til 1.- 9.fl – hetta er galdandi fyri Hoyvíkar skúla, Kollafjarðar skúla, Skúlan við Løgmannabreyt og Skúlan á Hamrinum
5. <u>**at**</u> við einari eind verða valmøguleikarnir hjá næmingunum fleiri, og grundarlagið fyri einum so góðum og fjølbroyttum 10. flokstilboðið í trá við ætlanina við fólkaskúlalógini er tí til staðar
6. <u>**at**</u> við einari eind fáa næmingarnir eitt tilboð, sum fakliga og handaliga røkkur so nógvum næmingum sum møguligt
7. <u>**at**</u> við einari eind er gott grundarlag fyri einum ungdómsumhvørvi, sum verður avbjóðandi og spennandi hjá næmingunum
8. <u>**at**</u> lærararnir í eindini fara bert at undirvísa í 10. flokki og hava tí einans hesar næmingarnar at hugsa um
9. <u>**at**</u> við greiða skilnaðinum millum 10. fl. og restina av skúlanum, fara næmingarnir í størri mun at kenna undirvísingina sum byrjanina til miðnám og/ella verkliga útbúgving, heldur enn sum endan á fólkaskúlanum
10. <u>**at**</u> í Eysturskúlanum eru tøk høli við egnari inngongd. Hølini eru væl egnað til endamálið, soleiðis at tað ber til at skipa 10. flokk í eini lon, so skilnaður er millum 10. flokkarnar og restina av skúlanum,
11. <u>**at**</u> umstøðurnar at skapa eitt gott 10. floks umhvørvi eru góðar, bæði tá hugsað verður um lærings- og sosialt umhvørvi.
12. <u>**at**</u> í Kommunuskúlanum er ov trongt,
13. <u>**at**</u> aðrir myndugleikar hava víst á, at ov nógvir persónar eru í mun til støddina á skúlanum og undirvísingarhølum, og at tað tí ikki er ráðiligt framhaldandi at halda fast við eitt so høgt næmingatal,

14. **at** framhald av trongu umstøðunum í Kommunuskúlanum fer at hava negativa ávirkan á umstøðurnar hjá øllum øðrum næmingunum í skúlanum, tí fysisku karmarnir hjá teimum verða trengri,
15. **at** heildarætlanin fyri dagføring av Kommunuskúlanum tekur støði í, at skúlarnir í kommununi verða bygdir til 1. – 9. flokk,
16. **at** heildarætlanin fyri dagføring av Kommunuskúlanum eisini tekur støði í, at skipaðar verða nútímans og nøktandi hølisumstøður út frá námsfrøðiligum atlitum, og innanfyri karmarnar av galdandi byggisamtykt,
17. **at** byggisamtyktin ikki loyvir útbyggingum, ið geva rúm fyri bæði eini dagføring og harafturat eina víðkan við undirvísingarrúmum og øðrum atknýttum rúmum til ein 10. floks depil í Kommunuskúlanum eisini, tí hetta vil viðføra eina ”yvirbygging” á uml. 20% útum tað mest loyvda,
18. **at** um byggisamtyktin hevði loyvt eini størri útbygging, er eyka kostnaðurin fyri at útbyggja Kommunuskúlan til eisini at hýsa 10. flokkum mettur til 18 til 22 mió kr., afturat kostnaðinum av at dagføra skúlan,
19. **at** avgerð býráðsins um at útseta íverksetanina av nýggju 10. floks skipanini frá 2009/10 til skúlaárið 2010/11 var at geva skúlunum, sum ikki framhaldandi skuldu hava 10. flokk betri tíð til at laga seg til broytingarnar,
20. **at** tímatillutanin verður umleið tann sama, so størvini verða verandi í Tórshavnar kommunu.
21. **at** Mentamálaráðið hevur góðkent nýggju 10. floks skipanina við teim fyrisitingarteknisku broytingum, ið fólkaskúlalógin krevur
22. **at** Mentamálaráðið hevur góðkent, at 10. flokkur verður skipaður sum serskild eind í Eysturskúlanum, sum ein í leiðsluni í Eysturskúlanum burtur av kemur at varða av, við lærarum, sum burtur av skulu undirvísa í 10. flokki í tann mun hetta letur seg gera

**mælir fíggjarnevndin býráðnum til**, at frá skúlaárinum 2010/11 verður ein 10. floks eind í Tórshavnar kommunu, sum verður í Eysturskúlanum sambært avgerð frá Mentamálaráðnum.

**Býráðið 17. desember 2009:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, um, at málið um 10. flokk verður beint í mentamálanevndina til nýggja viðgerð, og at býráðssamtyktin frá 27. mars 2008, verður sett úr gildi, og at verandi skipan við 10. flokkunum heldur fram í Tórshavnar kommunu. Hetta skal skiljast soleiðis, at meðan málið verður viðgjørt av nýggjum, verða tað framhaldandi 10. flokkar á Argjum, Venjingarskúlanum, Kommunuskúlanum og í Eysturskúlanum, til býráðið hevur samtykt annað, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Levi Mørk.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Levi Mørk um, at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini við ískoyti um at senda landsstýriskvinnuni í mentamálum áheitan um at kanna, um undantaksheimild kann finnast í fólkaskúlalógini at skipa 10. flokseindina í Tórshavnar kommunu við sjálvstøðugari leiðslu, um heimild ikki er fyri hesum, so at taka stig til at lógin verður broytt, og at laga leiðslubygnaðin til so skjótt sum lógargrundarlag er fyri hesum. Og harumframt at mæla býráðnum til at biðja borgarstjóran skipa fyri kunnandi fundi komandi mánadag fyri áhugaðum næmingum og foreldrum um innihald í og karmar um framtíðar 10. flokseindina í Tórshavnar kommunu, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Levi Mørk.

Greiddu ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

**259/09** **<u>2009-2916</u>**

**<u>Vinnustykkið við Karlamagnusarbreyt – III. byggistig.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður eisini til j. nr. 2006-1899, "Útstykking fram við Miðstaðargøtu - Karlamagnusarbreyt - vinnuøki Karlamagnusarbreyt"

Í sambandi við byggibúningina av vinnustykkjunum framvið Karlamagnusarbreyt, hevur umsitingin í samráð við borgarstjóran og kommunustjóran biðið um tilboð upp á liðugtgerð av ovastu vinnustykkjunum, sum liggja omanfyri Rólantsgøtu – byggistig III – frá arbeiðstakaranum sum hevur arbeiðið upp á niðara partin av vinnustykkjunum, við støði í somu eindarprísum. Hetta fyri at eisini hesi stykkini
kunnu seljast á sama støði og fyri sama kostna sum øll hini vinnustykkini á Karlamagnussarbreyt.

Tilboðið frá P/F Guttesen & Staksberg er áljóðandi kr. 3.576.235,- u. mvg. Samlað kostnaðarmeting, íroknað óvæntað, projektering og eftirlit og 6,25% mvg, er mett til kr. 4.118.499,69. Metingin ið gjørd varð í samband við prísásetingina er upp á kr. 3,825 mió., og er sostatt ein meirkostnaður á kr. 293.499,69. Umsitingin metir tó, at hesin munur kann haldast innanfyri tað sum er avsett til óvæntað í játtanini til niðara part av Karlamagnussarbreyt (j. nr. 2006-1899).

Bygginevndin hevur biðið um, at umsitingin viðgerð tilboðið, til bygginevndina at taka støðu til.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður av tilboðnum hjá Guttesen & Staksberg og at játtaðar verða kr. 3,825 mió. til liðugtgerð av vinnustykkjum omanfyri Rólantsgøtu.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Útsett.

**Bygginevndin 16. november 2009:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá HMP-Consult um at samráðast um sáttmála fyri arbeiðið við støði í fyriliggjandi tilboði.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tikið verður av tilboðnum hjá Guttesen & Staksberg og at játtaðar verða kr. 3.825 mió. til liðugtgerð av vinnustykkjum oman fyri Rólantsgøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. november 2009:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Levi Mørk samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinri fundi.

**Figgjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**260/09** **<u>2005-1122</u>**

**<u>Ábøtur á Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum partur av støðuga arbeiðnum at halda við líka og bøta um viðurskiftini í miðbýnum og ásannandi, at verandi flísalegging á Niels Finsens gøtu er í ringum standi, hevur umsitingin gjørt uppskot til nýtt snið, tilfar og skipan. j. nr. 2005-1122.

Uppskotið leggur upp til, at ein 1-sporað koyribreyt verður asfaltløgd, endað við trimum røðum av chausses-steinum. Millum koyribreytina og gongubreytina verður skipaður ein geiri, har ljós, beinkir, ruskspannir og skeltir skulu verða.

Lagt verður upp til, at flísarnar á gongubreytini verða skiftar til sama slag, sum er á gongubreytunum í miðbýnum annars - betongflísar við chausses-steinum ímillum.

Uppskotið leggur upp til, at gosvatnið á vegamótinum Sverrisgøta/ Niels Finsens gøta verður burturbeint, og tískil skal avgerð takast um, hvørt arbeiðið skal gerast í einum tveimum stigum.

Um so er, at avgjørt verður at gera arbeiðið í stigum, kann 1. partur vera at leggja asfalt, chausses-steinarnar og seta upp nýggjar lampur og beinkir tveimum teinum - av Vaglinum niðan til gosvatnið og frá gosvatninum niðan í Steinatún. Sí kortskjal 1. stig.

2. partur kann so vera at skifta flísarnar á gongubreytunum og at beina gosvatnið burtur. Sí kortskjal 2. stig. nr. 2005-1122.

Ætlanin er at byrja arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina í samband við at játta kr. 900.000 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur gjørt eitt nýtt uppskot. Í staðin fyri asfalt verða brúgvasteinar nýtt sum belegning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við nýggja tilmælinum og at kunna grannarnar í góðari tíð.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur saman við HMP consult gjørt útbjóðingartilfar. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 1.568.100 kr. íroknað mvg.

Mælt verður til at góðtaka uppskotið og at mæla fíggjarnevndini til at játta peningin umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, tekur undir við uppskotinum og beinir málið í teknisku nevnd.

Somuleiðis samtykti meirilutin at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við fíggjan av konto fríðkan av býnum 2005/2006 og at hava kunnandi fund við grannarnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til, at kunnandi fundur verður við grannarnar, áðrenn málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar tann 28. september 2005.

Samtykt at mæla býránum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 1.568.000 av íløgum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Málið framlagt.

**Ískoyti:**
2 virki vóru boðin at geva undirhondsboð uppá álegging av brúgvarsteinum í Niels Finsensgøta, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

J & K Petersen 3.633.592 kr.
Articon 1.893.750 kr.

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at byrja samráðingar við Articon um gerð av arbeiðinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at taka upp samráðingar við Articon.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon og at játta kr. 1.600.000,00 av íløgum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tilboðið hjá Articon ljóðaði upp á 1.893.750 kr. uttan mvg, svarandi til 2.012.109 kr. við 6,25% mvg. Játtað var 1.600.000 kr. Til liðugtgerð av arbeiðið vantar solstatt 412.109 kr.

**Tilmæli:**
Býararkitektin mælir til at játta 412.109 kr. til liðugtgerð av belegning á Niels Finsengøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at peningurin verður nýttur av konto fyri fríðkan av býnum.

**Ískoyti:**
Koyribreytin í Niels Finsensgøtu er nú skift út, og sambært upprunaligu ætlanini verður næsta stig at skifta belegning á gongubreytini og uppseting av nýggjum lampum frá Steinatúni og oman til Gamla Bókhandil. Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting.

| | |
|---|---|
| Stig 1. Býráðssalurin – Káta Hornið | 348.000 kr. |
| Stig 2. Føroya Banki – Kondittarríið | 290.000 kr. |
| Stig 3. Býráðssalurin – Mylnugøta | 390.000 kr. |
| | |
| Pláss 1. Springvatnið – Ebenezer | 340.000 kr. |
| Pláss 2. Innkoyring við Steinatún | 270.000 kr. |
| | |
| 21 stk. Lampur v. uppseting | 379.500 kr. |
| Projektering, óvantað og mvg. | 524.550 kr. |
| | |
| Samlaði kostnaðin eru mett til | 2.700.928 kr. |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur við ætlanini at arbeiða víðari at liðugtgera Niels Finssensgøtu, og at nevndin heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening á konto "fríðkan av býnum".

Býararkitektin mælir til at taka undir við uppskotinum og at gera teinar 1,2 og lampur á hesum teinunum til samlaðan kostnað við projektering/eftirlit, óvæntað og mvg upp á tilsamans 1.542.050 kr. Peningurin til hetta arbeiðið skal fíggjast av konto fyri fríðkan av býnum, soleiðis at ætlaðar íløgur á hesari kontoini vera raðfestar á henda hátt:

| **Fríðkan av býnum** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|
| Økið til Müllers pakkhús | 800 | 0 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur | 500 | 1.800 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur gongubreyt | 0 | 1.200 | 400 |
| Vaglið | 0 | 0 | |
| Tinghúsvegur | 400 | 0 | |
| Tinghúsvegur ognir hjá TK | 200 | | |
| Sverrisgøta/ Dr. Jacobsensgøta, ábøtur | 0 | | |
| Síðuvegir, atkoma, gøtur o.a. | 100 | 300 | |
| Kirkjugarðurin á Svínaryggi | 100 | 200 | |
| Onnur fríðkan | | | |
| Steinatún | | | |
| | | | |
| **Fríðkan av býnum** | **1.900** | **3.700** | |

Hetta merkir, at játtast skulu 1.2 mill. kr. av íløgunum fyri fríðkan av býnum fyri 2006, og at játtast skulu 400 túsind kr. av íløgunum fyri 2007.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at arbeiðast skal eftir uppskotinum um heildarloysn fyri Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún, soleiðis at málið kann sendast til teknisku nevnd til ummælis.

Til hetta málið var Michael Jacobæus, lendisarkitektur, og greiddi frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006**: Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at marka 1,2 mió kr. av íløgum í 2006 og 400.000,00 kr. í 2007 til ábøtur á N. Finsensgøtu.

Eisini samtykti nevndin, at umsitingin hevur kunnandi fund við handlarnar fram við gøtuni um ætlaðu heildarloysnina frá Vaglinum niðan til Steinatún.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Heðin Mortensen, mælir býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanar-nevndini.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, tekur støðu á býráðsfund-inum.

**Býráðið 29. juni 2006:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
2 virki eru biðin um at geva undirhondsboð upp á liðugtgerð av gongubreytini í Niels Finsensgøtu, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

Sí hjálagt tilboð

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tí lægsta tilboðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Innkomnu tilboðini vóru: J.& K Petersen kr. 2.2604.637 u/mvg og Articon kr. 1.976.430 u/mvg.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum, umvegis fíggjarnevndina til, at taka av lægra tilboðnum frá Articon. Við mvg er kostnaðurin hjá Articon kr. 2.099.000,00. Harumframt koma 10 ljósmastrar fyri tilsamans 120.000,00 kr.

Mælt verður býráðnum at játta kr. 1,2 mió kr av íløgum 2006 og 1 mió av íløgum fyri 2007. Eisini at kunna handilslívið um arbeiðsætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til framhaldandi umvæling av Niels Finsensgøtu vóru 450.000 kr. eftir á konto 1038-38007, ábøtur á Niels Finsensgøtu. Sambært uppruna ætlanini manglar enn at gera:

Gongubreyt millum Ebenezer og Cafe Mika.
Innkoyring frá Steinagøtu.
Økið uttan um gosvatnið.
(Sí kostnaðarmett uppseting í málslýsing.)

Mett verður at ein partur av eftirverandi arbeiði kann gerast fyri nevndu upphædd. Vísandi til, at stórur partur av eftirverandi játtan, uml. 300.000 kr, er flutt til annað arbeiði, er umráðandi, at peningur verður útvegaður til at kunna halda fram við liðugtgerð av hesum arbeiði. Í fíggjaríløgukarmaarbeiðinum blivu fyri 2009 markaðar 500.000 kr til framhaldandi arbeiði av verkætlanini.
Mælt verður til at halda fram við verkætlanini og at játta kr. 500.000, ið eru markaðar sum „gongugøtan í miðbýnum", í íløguætlanini fyri 2009 til hetta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fram við verkætlanini og at játta kr. 500.000, markaðar til hetta arbeiðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 9. desember 2009**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**261/09** **2001-1579**

**Endurskoða og víðka heildarætlanina fyri Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Á íløguætlanini fyri 2005 eru 200.000 krónur settar av til heildarætlanina.

Skotið verður upp fyri byggi- og býarskipanarnevndini, at heildarætlanin fyri Tórshavn, samtykt 2004, verður endurskoðað - ásannandi, at síðani ætlanin var gjørd, eru kommunumørk flutt, so stórt lendi er lagt aftrat í syðra og vestara parti av núverandi Tórshavnar kommunu, uttan at tað er tikið nevnivert við í heildarætlanina.

Endurskoðanin miðar eftir, at javnvág verður í framtíðar útbyggingini, so eitt nú Vesturbýurin og økið hjá fyrrverandi Argja kommunu verða raðfest hægri, og at økið hjá fyrrverandi Kirkjubøar kommunu hesumegin Reynið verður tikið við í heildarætlanina fyri Tórshavn. Í framtíðrætlanunum verður eisini miðað eftir, at trivnaðurin og menniskjað verða í fokus.

Í fyrstu syftu verður dentur lagdur á at raðfesta bústaðar- og vinnuøki í Vesturbýnum og økinum hjá fyrrverandi Argja kommunu við hartil hoyrandi møguleikum fyri trivnað við frílendum, spæliplássum, gøtum, ítróttarvøllum/hallum o.l. og atkomumøguleikum við vegum, brúm o.l.

Einstøk øki eru í heildarætlanini løgd av til umrøddu endamál í pørtum av hesum økjum, men í flestu førum liggja ætlanirnar um tey langt úti í tíðarætlanini, sum uppsett er í heildarætlanini. Staðfestast kann, at bústaðarøkið á hesum leiðum, sum eru løgd út í fyrstu framtíð, ikki tykjast verða bygd eftir teimum ætlanum, sum hava ligið fyri.

Ein stórur partur av hagtalsliga grundarlagnum undir teirri ætlaðu endurskoðanini liggur í tí tilfari, sum hesi seinastu árini er fingið til vega og gjøgnumarbeitt í sambandi við ta heildarætlanina, sum býráðið samtykti í 2004.

Annar liður í hesum arbeiði verður at gera uppskot um og ætlanir fyri, hvussu Tórshavnar kommuna kann skipa og nýta tær stóru víddir, sum kommunan er vaksin við við samanleggingini við Kirkjubøar kommunu. Her er talan um øki bæði til trivnaðarendamál, bústaðarendamál, vinnuendamál o.a.

Miðað verður eftir, at fyrri liður av setninginum verður liðugur til framløgu 1. oktober 2005 og annar liður tíðliga í 2006.

Fylgibólkur við politiskari og embætismannumboðan verður settur. Mælt verður til, at tríggir limir í byggi- og býarskipanarnevndini verða valdir í stýringarbólkin saman við býararkitektinum og býarverkfrøðinginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin verður javnan tikin við upp á ráð í arbeiðnum eins og skipað verður fyri dialogi við almenningin, áðrenn ætlanin verður løgd fyri býráðið til endaliga samtykt.

Býarskipanardeildin hevur tann verkliga partin av arbeiðnum um hendur og kann søkja sær serfrøðingaráðgeving.

Skotið verður upp at játta kr. 200.000 av íløgunum 2005 til arbeiðið.

Vísandi til omanfyristandandi verður mælt nevndini til at samtykkja

at farið verður undir at endurskoða heildarætlanina fyri Tórshavn, samtykt 2004, sum skjótast
at settur verður fylgibólkur við trimum limum úr byggi- og býarskipanarnevndini, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum og
at mælt verður býráðnum til - um fíggjarnevndina - at játta kr. 200.0000 av íløgunum 2005 til arbeiðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Nevndin mælir býráðnum til at velja í stýringarbólkin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, býararkitektin og býarverkfrøðingin.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndina.

**Býráðið 26. mai 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin varð kunnað um, at stýringarbólkurin viðv. heildarætlanini hevur skipað seg við Jógvani Arge sum formanni og Mikael Viderø sum skrivara.

Bólkurin hevur havt sín fyrsta fund við ráðgeva um møguleikarnar fyri at fremja ætlaðar broytingar í heildarætlanini fyri miðstaðarøkið.

**Ískoyti:**
Stýringarbólkurin hevur nú saman við ráðgevanum Rambøll Nyvig gjørt eitt uppskot til eina endurskoðaða heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu.

Smærri rættingar í uppskotinum eru eftir at gera.

Eisini er millum annað neyðugt at taka støðu til umsókn hjá p/f Jákupi á Dul, áðrenn støða kann takast til endaliga uppskotið til endurskoðaða heildarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at arbeiðið við Heildarætlanini er eitt framhaldandi arbeiði sum eftir ætlan skal endurskoðast 5. hvørt ár, verður við hesum heitt á nevndina um at mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndina, at játta kr 500.000, sum avsettar eru á fíggjarætlanini fyri 2008 til hetta arbeiðið.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at mælt verður býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 500.0000 av íløgunum 2008 til arbeiðið arbeiðið at endurskoða heildarætlanina fyri Tórshavn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. august 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at arbeiðið við Heildarætlanini er eitt framhaldandi arbeiði sum eftir ætlan skal endurskoðast 5. hvørt ár, samtykti byggi- og býarskipanarnevndin 18. aug. 2008 at játta pening til endurskoðanina. Arbeiðsuppgávan er tillagað soleiðis, at heildarætlanin eisini skal fevna um rammuætlanir fyri ymsu vakstarøkini, umframt aðrar tillagingar. Umsitingin greiðir nærri frá hesum. Játtanin frá 2008 er brúkt til ymsu forkanningarnar og arbeiðið sum higartil er gjørt, herundir vegaplanlegging og aðrar kanningar sum ikki varð roknað við í 2008. Í 2009 er onki játtað til viðlíkahald av heildarætlanini, sum annars hevur verið vanligt undanfarin ár. Tørvur er tí á uml. 450.000 kr. afturat til liðugtgerð av heildarætlanini. Umsitingin metir at fíggjartørvurin kann loysast innan málsøkið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, uttan eykajáttan, við at flyta avlop á kr. 472.000 av konto 90-1038–38010 Kapellið, til konto 1010-90-10008 Heildarætlan, at gera arbeiðið við endurskoðan av heildarætlanini fyri Tórshavn liðugt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at flyta avlop á kr. 472.000 av konto 90-1038–38010 Kapellið, til konto 1010-90-10008 Heildarætlan, at gera arbeiðið við endurskoðan av heildarætlanini fyri Tórshavn liðugt, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina. Somuleiðis samtykti nevndin at heita á býráðið um at velja stýrisbólkin av nýggjum.

**Figgjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt og at velja Boga Andreassen, Elin Lindenskov og Jan Christiansen í stýrisbólkin.

**262/09** **<u>2008-3994</u>**

**<u>Høvuðsumvæling og víðkan av havnarskrivstovuni</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Flutt bleiv inn í verðandi havnarskrivstovu í 1987. Havnarskrivstovan, sum er ovasta hædd omana á bygninginum hjá Faroe Ship, er 152 $m^2$ til víddar.

Síðani innflytingina eru at kalla ongar ábøtur gjørdar, og eru hølir og innbúgv nú merkt av sliti, umframt at umstøðurnar hjá starvsfólkunum, trongja til bata.

Ovasta hæddin á bygninginum er tilsamans 241 $m^2$, harav verðandi havnarskrivstova er 152 $m^2$ , meðan Faroe Ship eigur restina 90 $m^2$.
Faroe Ship eru sinnaðir at leiga 45 $m^2$ til Tórshavnar havn frá 1/1-2009 at rokna, og aðrar 45 $m^2$ frá 1/1-2010 at rokna.

Faroe Ship langtíðar leigar grundøkið undir bygninginum frá Tórshavnar havn.

Í uppskotinum til leigusáttmálan við Faroe Ship, j. nr.2008-3994, um at leiga teirra part av ovastu hæddini, er leigumálið galdandi til 2018, ella so leingi sum leigan um grundøkið er galdandi.

Umframt at vaksa um havnarskrivstovuna, er ætlanin at gera umfatandi broytingar av havnarskrivstovu og innbúgvi, sum er mett at kosta 1,5 mió.

Í byggitíðini verður helst neyðugt at flyta í onnur hølir.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála j.nr. 2008-3994

Eisini verður mælt til at bjóða út arbeiðið at høvuðsumvæla havnarskrivstovuna.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

- Dispositiónsuppskot er gjørt, og verður lagt fyri nevndina.
Ætlanin er at bjóða arbeiðið út til heystar, soleiðis at arbeiðið kann byrja um ársskiftið.

Arbeiðið tekur umleið ½ ár.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at taka undir við dispositiónsuppskotinum, at projektera og at bjóða arbeiðið út til heystar.

**Havnarnevndin 18. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

-Arbeiðið hevur verið boðið út sum totalinterprisa í innbodnari licitatión, sum varð hildin tann 30. november 2009:

| | |
|---|---|
| Byggivirkið H.H. | 1.396.425,- |
| Búsetur | 1.085.673,- |
| ÁTS | 1.494.625,- |
| Valbjørn Dalsgarð | 1.437.240,- |
| Jógvan Hans Østerø | 1.724.492 |

Kostnaðurin fyri projektering, eftirlit, innbúgv, teldur og óvæntað er mettur til kr. 914.327,-.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá Sp/f Búsetur upp á kr. 1.085.673,-, og at játta tilsamans 2 mió. av íløgum hjá Tórshavnar havn.

**Havnarnevndin 7. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Figgjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**263/09** **<u>2004-0660</u>**

**<u>Nýtt røktarheim við Hoyvíkstjørn</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum um eldraøkið, sum arbeiðsbólkur læt landsstýrismanninum í almannamálum í 2002, verður staðfest, at Suðurstreymoy er tað økið, sum yvirhøvur er ringast fyri, tá hugsað verður um tørvsfulnað í mun til búpláss. Bráfeingistørvurin er 37 røktarheimspláss, eftir at ætlaða heimið fyri minnisveik er tikið í nýtslu.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur til ymiskar verkætlanir kring landið játtað slakar 40 mió. kr. av samlaðu játtanini uppá 58 mió. kr. fram til 1. januar

2005, tá eldraøkið verður lagt út til kommununnar at umsita og fíggja, bæði tá talan er um íløgur og rakstur. Sostatt eru 18 mió. kr. eftir av játtanini, sum væntandi verða býttar út í heyst eftir tá fyriliggjandi umsóknum og verkætlanum.

Landsstýrismaðurin hevur alment boðað frá, at tað eru kommunurnar sjálvar, sum mugu taka stig til verkætlaninar.

Tá kommunan keypti gomlu marinustøðina, var samstundis gjørt av, at bygningurin og økið rundanum burturav var brúkt til frama fyri tey gomlu í kommununi.

Umsitingin hevur latið kannað, um møguligt er at byggja eitt røktarheim á økinum. Mett verður, at møguleiki skuldi verið fyri at bygt eitt røktarheim á økinum við pláss fyri 24 búfólkum.

Ognin matr. nr. 1056d og 1056e liggur í A1 øki, men sambært plandeildina er økið eisini umfatað av serstøku byggisamtykt nr. 7, sum er útlagt sum E-øki, kannað almennum endamálum. Sambært serstøku byggisamtyktini átti tí einki at verið til hindurs fyri at bygt nýtt røktarheim í økinum, men plandeildin metir tað ikki rætt at leggja seg fast á nevnda øki, fyrr enn broytingarnar av ásetingunum fyri A1 øki eru góðkendar í Oljumálastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla sosialu nevnd til at taka undir við, at fyrireikingar verða gjørdar til at byggja nýtt røktarheim, og at byggiprogramm verður gjørt.

**Sosiala nevndin 10. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og játta kr. 100.000,00 av konto 40 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiprogrammi.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur, settur av trivnaðarstjóranum, hevur gjørt byggiskrá fyri nýtt røktarheim ætlað 24 búfólkum. Mælt verður til, at røktarheimið verður sambygt við Tjarnargarð, og verður møguleiki tá at gera nýtslu av felagsfasilitetum, so sum ergo- og fysioterapi.

Oljumálastýrið hevur góðkent broytingarnar í almennu byggisamtyktini fyri A1 øki, og skuldi tí onki verið til hindurs fyri, at røktarheimið verður bygt á økinum við Tjarnargarð.

Ásannandi at verandi røktarheimstilboð langt frá nøkta tørvin, verður mælt til, at nýggja heimið verður fyri tey tungu røktarkrevjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at góðkenna hjáløgdu byggiskrá, dagf. des. 2003, og at kr. 300.000,00 verða játtaðar av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av dispositiónsuppskoti, soleiðis at søkjast kann um

stuðul frá Almannamálaráðnum sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001 um studningslán til ellis- og røktarheim.

**Sosiala nevndin 17. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og beina málið í býráðið og síðani í tær nevndir, sum samb. mannagongd í sambandi við byggimál eisini skulu viðgera málið.

**Býráðið 29. januar 2004:** Einmælt samtykt at taka undir við sosialu nevnd at gera fyrireikingar til bygging av ellis- og røkarheimi, soleiðis at søkjast kann um stuðul frá Almannaráðnum, sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001, og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og leggja saman matr.nr. 1056e og matr. nr. 1056d, soleiðis at byggjast kunnu 1250 m², vísandi til ásetningarnar fyri økið.

**Tekniska nevnd 2. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum at lata gera parkeringspláss inni á økinum matr.nr. 1056d og at atkoma verður frá Stoffalág.

Eisini mælir nevndin til, at parkeringsplássið inn frá Stoffalág verður til almenna parkering.

**Nýtt:**
Eftir áheitan frá byggideildin hevur Selmar Nielsen, Arkitektur Spf, gjørt dispositiónsuppskot, sum verður lagt fyri nevndina til góðkenningar.

Við einum m² prísi uppá kr. 17.123 verður samlaði kostnaðurin íroknað 6,25% MVG mettur til kr. 26.112.091.

Sambært løgtingslóg nr. 70 frá 2. mai 2001 um studningslán til ellis- og røktarheim kann væntast, at Almanna- og heilsumálaráðið játtar kr. 12.000.000,- til verkætlanina.

Fyri Tórshavnar kommunu verður kostnaðurin sostatt kr. 14.112.091,-.

Eisini er gjørd ætlan fyri fríðkan av øllum grundøkinum við sambinding til Hoyvíkstjørn og ímóti Hoyvíksvegnum. Kostnaðurin av hesum arbeiði verður mettur til kr. 1.232.500,-.

Selmar Nielsen, arkitektur, verður við á fundinum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna dispositiónsuppskotið við tíðarætlan dagfest september 2004. Eisini verður mælt til í sambandi við verkætlanina, at alt grundøkið verður fríðkað og sambundið við Hoyvíkstjørn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

500.000 kr. eru tøkar á konto 40 í 2004 til verkætlanina, so mælt verður til, at 1,5 mió. kr. verða játtaðar av íløguætlanini fyri 2004, 3,6 mió. kr. av íløguætlanini fyri 2005, 6,8 mió. kr. av íløguætlanini 2006 og 3,3 mió. kr. av íløguætlanini fyri 2007.

**Sosiala nevndin 7. september 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og beina málið til teknisku fyrisitingina til liðugtgerð av projekti og útbjóðing.

**Nýtt:**
Arbeiðið at byggja røktarheimið verður boðið út í september 2005. Støða skal takast til útbjóðingarhátt.

Í projekteringsfasuni er komið eftir, at neyðugt er við lyft millum kjallara og stovuhædd, sum kostar kr. 300.000,00. Eisini hava prís- og lønarhækkingar verið, sum eru mettar til kr. 672.000,00.

Samlaði meirkostnaður við 6,25% mvg í mun til upprunaligu kostnaðarmetingina verður sostatt mettur til kr. 1.032.000,00.

Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggju kostnaðarmetingina uppá íalt kr. 28.081.364,00 við 6,25% mvg, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Sosiala nevnd 7. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at góðkenna nýggja kostnaðarmeting uppá kr. 28.081.364,00, og at arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku millum í minsta lagi 5 arbeiðstakarar.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión.

Inn komu 4 tilboð, og var licitatión mánadagin 25. oktober 2005. Úrslitið varð:

| | |
| --- | --- |
| Sp/f Búsetur | kr. 16.763.275,00 u/mvg |
| Sp/f Valbjørn Dalsgarð & J & K Petersen | kr. 17.264.283,52 u/mvg |
| Sp/f ÁTS v/Karstin Vang | kr. 18.275.550,00 u/mvg |
| P/F Articon | kr. 19.885.128,33 u/mvg |

Ráðgevin Selmar Nielsen Arkitektur S/pf hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum.

Ráðgevin hevur dagført kostnaðarmetingina, so hædd nú er tikin fyri øllum hugsandi útreiðslum í sambandi við liðuggerð av heiminum, fram til klárt er hjá búfólkunum at flyta inn. Nýggja metingin kr. 28.080.163,- er innan fyri játtaða fíggjarkarmin. Tó er í kostnarmetingini ikki tikin hædd fyri møguligum prís- og lønarvøkstri í byggitíðini. Leystliga mett kann roknast við einum prís- og lønarvøkstri uppá 3% ella kr. 845.000,-

Bygginevndin og býararkitekturin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur og at samráðast við arbeiðstakaran um sáttmála. Eisini verður mælt til at játta kr. 845.000,- eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur í byggitíðini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og býararkitektinum og taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur.

Eisini verður mælt til at góðkenna dagførdu kostnaðarmetingina frá november 2005 og at játta kr. 845.000,- eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur, soleiðis at samlaða íløgujáttanin verður kr. 28.125.000,-.

**Sosiala nevndin 8. november 2005:** Ein samd nevnd tekur undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum um at taka av tilboðnum frá Sp/f Búsetur.

Ein meirluti, Katrin Dahl Jakobsen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen, samtykti at góðkenna dagførdu kostnaðarmetingina frá november 2005 og mælir býráðnum, um fíggjarnevdina, til at játta kr. 845.000,00 eyka til møguligan prís- og lønarvøkstur í byggitíðini, soleiðis at samlaða íløgujáttanin verður kr. 28.925.000,00.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at projektið verður framt innan fyri kostnaðarmetingina frá 7. juni 2005 á kr. 28.080.163,00.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum frá p.f. Búsetur uppá kr. 16.763.275,00.

Eisini samtykt at játta kr. 16.925.000,00 av íløgum og at leggja út kr. 12.000.000,00 fyri væntað studningslán frá almanna- og heilsumálaráðnum. Samlaði kostnaðurin verður sostatt kr. 28.925.000,00.

Í byggitíðini skal yvirlit yvir fíggjarligu gongdina og tíðarætlanin leggjast fyri borgarstjóran og kommunustjóran 14. hvønn dag.

**Býráðið 24. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 24. mai 2006 boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at geva Tórshavnar kommunu endaliga tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 12. mió kr., ið er treytað av, at Verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina Í minsta lagi eitt umboð fyri Heimarøktina verður valt í bygginevndina.

Harumframt verður víst til treytirnar, sum annars eru ásettar í løgtingslóg nr. 166 frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis- og røktarheim og sambýli.

**Sosiala nevnd 13. juni 2006:** Kunnað varð um málið.

Í sambandið við avhendanina av Røktarheiminum við Hoyvíkstjørn hava nakrir trupulleikar stungið seg upp millum byggiharran (Tórshavnar kommunu) og høvuðsarbeiðstakaran (P/F Búsetur).

**Dagbøtur/eykadagar**
Arbeiðið var avhendað 56 arbeiðsdagar seinni enn ásett var í sáttmálanum, og tí hevði TK afturhildið kr. 962.080,- fyri dagbøtur (56 dagar á kr. 17.180,-).

Búsetur helt hinvegin fast í, at TK hevði umbiðið so nógv eykaarbeiðir, at teir høvdu rætt til 65 eykadagar, og at arbeiðið sostatt ikki var seinka.

**Indexreguleringar sbr. ABF 92**
Búsetur hevði sent fakturar uppá indexreguleringar fyri tils. kr. 158.231,62 (uttan mvg) fyri tíðina aftaná avhendingardagin sambært sáttmálanum, og hesar hevði TK avvíst at rinda, við tí grundgeving, at ein ikki hevur rætt til at indexregulera, fyri tíðina arbeiðið er seinkað orsaka av arbeiðstakaraávum.

**Prísregulering av jørðarbeiðið**
Nøgdirnar, ið skuldu koyrast til og frá, í sambandið við jørðarbeiðið, vístu seg at verða munandi størri enn mett, og tí metti Búsetur seg hava rætt til at regulera í eindarprísunum fyri meirveitanina. Fyri hesa prísregulering sendi Búsetur ein faktura áljóðandi kr. 298.436,25 (uttan mvg).

TK hevur avvíst hesa rokning vísandi til at %-mørkini samb. § 14, stk. 3, 2. pkt. í ABF 92, skulu roknast í mun til høvuðsarbeiðstøku-upphæddina og ikki bert jørðarbeiðstøkuna.

**Feillevering av vindeygum**
Í sambandið við leveringina av vindeygunum, vísti tað seg, at nøkur teirra ikki vóru nýtilig orsaka av skeivum mátum. Búsetur segði seg ikki kunna taka ábyrgdina av hesum, tí tað lat seg ikki gera út frá tekningunum, at mátseta vindeyguni. Teir høvdu tí í samráð við byggieftirlitið eftir besta førimuni mátsett vindeyguni. Byggieftirlitið hevði góðkent bíleggingina áðrenn hon varð effektuera.

Prísurin fyri nýggj vindeygu við røttu mátunum var 85.693,75 (uttan mvg), sum Búsetur faktureraði víðari til TK.

TK noktaði at gjalda, við tí grundgeving, at arbeiðstakarin sjálvur hevur ábyrgdina av at gera arbeiðstekningar við røttu mátunum, og at hann ikki kann sleppa sær undan sínari professionellu ábyrgd, við at fáa byggiharran at góðkenna eina bílegging.

**Eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við bjálving í innveggjum**
Búsetur hevur sent faktura fyri eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við bjálving í innveggjum uppá kr. 167.256,25 (uttan mvg).

Búsetur vísti á, at bjálvingin ikki var nevnd í bygningslutafrágreiðingini og at bjálvingin heldur ikki var nevnd í teimum veggyvirlitstekningum, sum tilboðslistin og bygningslutafrágreiðingin vísa til.

TK noktaði at gjalda við tí grundgeving, at einhvør professionellur arbeiðstakari veit, at tað sjálvandi skal bjálving í allar innveggir, og tí átti Búsetur at vita hetta, longu tá tilboðið var givið.

**Eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við streymveiting til neyðdyr**
Búsetur hevur sent fakturar fyri eykaarbeiði/eykatilfar í sambandið við streymveiting til neyðdyrnar í røktarheiminum uppá tilsamans kr. 145.498,75 (uttan mvg).

Búsetur vísti millum annað á, at spenningsstøðið ikki var nevnt í útbjóðingartilfarinum, at upplýsingar um el-lutir á neyðdyrnum manglaðu í útbjóðingartilfarinum.

TK noktaði at gjalda við tí grundgeving, at útbjóðingartilfarið var greitt nokk til, at arbeiðstakarin kundi útvega sær allar neyðugar upplýsingar.

**Mótrokning fyri kostnað av at mála allar karmar á vindeygum og hurðum innantil**
Í sambandið við, at málingin var skødd/dottin av nógvastaðni á vindeyga- og hurðakørmunum innantil, bað TK ein málara um at umvæla og mála allar karmarnar. Fyri hetta rindaði TK kr. 92.000,- (uttan mvg).

TK hevur ført fram, at talan er um ein framleiðslufeil ella vindeyguni eru goymd á skeivan hátt, og tí er tað Búsetur, sum má hefta fyri mangulin mótvegis TK.

Búsetur hevur hinvegin ført fram, at tað var óneyðugt at mála allar karmar fullkomuliga av nýggjum. Feilurin hevði kunnað verið rættaður, við at mála tey støðini har málingin var dottin av. Hetta hevði kostað munandi minni.

**Gongdin í málinum**
Av tí at partarnir vóru sera langt frá hvør øðrum, vóru fleiri fundir hildnir og nógvar kanningar gjørdar fyri at finna út av, um møguligt var at finna eina semju, ella um neyðugt fór at verða at fara í gerarættin fyri at fáa loyst málið.

Á fundunum førdu partarnir fram teirra sjónarmið, og funnið varð fram til, hvørji prógv og skjalprógv partarnir ynsktu frá hvør øðrum.

**Viðv. dagbótum/eykadøgum**
Stórsti knúturin í málinum var spurningurin um TK hevði rætt til dagbøtur orsaka av ov seinari avhending, ella um Búsetur hevði rætt til eykadagar orsaka av eykaarbeiðum.
Hendan spurning varð brúkt sera nógv orka uppá. TK kravdi at Búsetur skjalprógvaði hvønn einasta eykadag, teir mettu seg hava rætt til orsaka av eykaarbeiðum. Hesi skjalprógv kom Búsetur við, og TK brúkti síðani nógva orku uppá eina kritiska gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum skjali.

Niðurstøðan hjá TK varð, at skjalprógvini vóru haldgóð, og at Búsetur tískil hevði løgfrøðiligt krav uppá í minsta lagið 56 eykadagar.

**Viðv. indexreguleringum sbr. ABF 92**
Av tí at Búsetur hevði rætt til eykadagar sambært omanfyri, høvdu teir eisini rætt til at indexregulera fram til "nýggja" avhendingardagin.

**Viðv. prísregilering av jørðarbeiðið**
TK helt fast í og skjalprógvaði, at %-mørkini sambært § 14, stk. 3, 2. pkt. í ABF 92, skuldu roknast í mun til høvuðsarbeiðstøku-upphæddina. Hetta valdi Búsetur at enda at góðtaka, og slepti kravinum.

**Viðv. feillevering av vindeygum, eykaarbeiði í sambandið/tilfari við bjálving av innveggum, eykaarbeiði/tilfari í sambandið við streymveiting til neyðdyr og kostnaðin fyri at mála allar karmar**
Hesi fýra punktini vóru partarnir sera ósamdir um. Talan var um nógvar torførar fakligar spurningar, og báðir partar høvdu nógv góð argumentir fyri teirra sjónarmiðum. Samanumtikið metti hvørgin partur, at tað var vert at fara í gerarættin við hesum lutfalsliga smáu upphæddunum, tí kostnaðurin av einum gerarrættarmáli er so stórur.

TK metti seg at hava góð útlit fyri at fáa viðhald fyri sínum sjónarmiðum í nøkrum førum, meðan útlitini í øðrum førum vóru munandi verri. Eftir at hava viga fyri og

ímóti, varð mett, at ein semja, har hvør partur átók sær helvtina av kostnaðinum, var góð fyri TK. Serliga um hugsa varð um tær spardu útreiðslurnar til eitt gerarrættarmál.

Partarnir samdust sostatt um, at býta hesar upphæddir soleiðis, at TK rindaði helvtina meðan Búsetur góðskrivaði helvtina. Um semjan verður góðtikin vil meirkostnaðurin fyri TK verða kr. 1.572.000,- við 6,25 % mvg.

**Samanumtikið**
verður mett, at samlaða semjan er til fyrimuns fyri kommununa, og at eitt møguligt gerarættarmál mest sannlíkt fer at geva eitt verri úrslit fyri kommununa. Hetta er í hvussu er galdandi, um havt verður í huga, at vanligt er, at hvør partur kemur at rinda helvtina av kostnaðinum av gerarrættarmálinum.

Deildarleiðaranum á løgdeildini mælir sostatt til at góðtaka semjuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá deildarleiðaranum á løgdeildini og at játta kr. 1.572.000,- av konto 90.

**Sosiala nevnd 18. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 1.572.000,- av konto 90.

**Ískoytistilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla samstundis til at kanna, um grundarlag er fyri at gera endurgjaldskrav galdandi móti ráðgevunum fyri projekteringsfeilum, og um so er at grundarlag er fyri hesum, verður biðið um heimild at reisa endurgjaldskrav.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at taka undir við ískoytistilmælinum frá stjórunum.

Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við sosialu nevnd, at fíggja av konto íløgum av konto 90 til eldraøkið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 27. november 2008:** Samtykt uttan atkvøðu-greiðslu.

**Nýtt:**
Staðfestir eru trupulleikar við lekum og kondensi í kjallara undir túninum við høvuðsinngongdina. Løgdeildin er komin til ta niðurstøðu, at kommunan eigur at bera kostnaðin av neyðugum eyka tilfar, meðan ráðgevin syrgir fyri og ber kostnaðin av, at arbeiðið verður gjørt. Kostnaðurin fyri kommununa verður kr. 76.000,- við 6,25% mvg.

Í sambandi við eftirlitsvitjan og áheitan frá Heilsufrøðisligu Starvsstovu varð uppskot til heildarloysn av køksviðurskiftunum fyri allan stovnin gjørt. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði og fyri neyðugar betringar av køkunum er kr. 286.000,- við 6,25% mvg.

Í sambandi við ósemjuna við arbeiðastakaran og kanningarnar hjá løgdeildin í hesum sambandi, varð ráðgevin av løgdeildini biðin um at hjálpa til at skjalprógva ymisk viðurskifti við arbeiðstakaran. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er kr. 47.300,- við 6,25% mvg.

Samlaði meirkostnaðurin fyri kommununa verður sostatt kr. 409.300,-

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta kr. 409.300 av íløgum á eldraøkinum í 2009.

**Sosiala nevnd 1. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 409.300 av íløgum á eldraøkinum 2009.

**Figgjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**264/09** **2009-0479**

**Sankta Frans skúli – smábarnaskúlin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grunddøki:**
Matr. nr. 779 f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68
Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3, og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðs-umhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m² x 16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.

Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum, um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanar-nevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum.

Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

**at** alt ov nógv er bygt á økið sum er.
**at** ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.
**at** nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skóg-friðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

| | |
|---|---|
| Byggistig: | 0,25 |
| Nettonýtslustig: | 0,30 |

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m².

Sambært hesum uppskoti er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr. nr. 779b, soleiðis at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum til ber.

Henda ætlan innber, at matr. nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.

Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779f upp á 4 m breiðan vegaskap. Tekning j. nr. 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a. Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005:

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587-34.

Nýggj umsókn, dagfest 24. juli 2003, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum, har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420 m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið: 1676 : 6776 = 0,25. Nettonýtslustigið verður: 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779a standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779a og matr. nr. 779b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til, at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**Ískoyti:**
**Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla**.
Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendið er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.
Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 m².

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni 2005 metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøðurnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

Byggiskrá og dispositiónsuppskot verða framløgd.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Brot úr byggiskránni:**
"Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Skt. Frans skúla. Nevndin er mannað av:

| | |
|---|---|
| Unnie Justinussen | Tórshavnar kommuna/tekniska fyrisiting |
| Høgni Joensen | Tórshavnar kommuna/trivnaðarfyrisitingin |
| Selmar Jacobsen | Skúlastjóri/Skt. Frans skúli |

Skrivari hjá nevndini er Rúni Abrahamsen MAP Arkitektar.

Tað hava verið gjørdar fleiri ætlanir at útbyggja Skt. Frans skúla, men lítið annað er hent enn onkrar hissini umvælingar.

Ein av orsøkunum at einki enn er hent, kann vera, at einki byggilendi er til skúlan. Onkur ætlan hevur verið at byggja niðaneftir móti viðalund og kleystrinum, men hesar eru steðgaðar av nátúrufriðingarnevnd og skógrøkt landsins. Fransiskanarar-systrarnar eiga eisini økið aftan yri skúrarnar við fimleikahøllirnar.

Kommunan hevur sent umsóknir til náttúrufriðingarnevndina, sum til síðst góðkendi eitt uppskot uppá 430 fermetrar í einari hædd, bygt har skúrarnir standa í dag. Náttúrufriðingarnevndin skal somuleiðis hava uppskotið til bygging til góð-kenningar.

Hetta hevur verið útgangsstøðið hjá bygginevndini."

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til, at bygginevndin arbeiðir víðari við byggiskránni, har kostnaðurin verður kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgv.

Skúlastýrið í Sankta Frans skúla hevur biðið um fund við mentamálanevndina um ætlanirnar hjá nevndini um byggjan av nýggjum smábarnaskúla til forskúla og 1. flokk.

**Mentamálanevndin 28. mars 2006:** Mentamálanevndin møtti á fundi í Sankta Frans skúla, har nevndin hevði fund saman við skúlastýrinum.

Samtykt at viðgera málið aftur á næsta fundi í mentamálanevndini, sum verður týsdagin 4. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentamálaleiðaranum at byggja skúlabygning fyri kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgvi, tilsamans kr. 9 mió.

Nevndin samtykti eisini at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at bjóða arbeiðið út í umvendari licitatión og at fíggja arbeiðið av íløgum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjar-nevndini og samtykt at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini og býararkitektinum:**
**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Sankta Frans skúla.

Nevndin kom við byggiskrá og uppskoti í mars 2006. Byggiskrá og uppskot var lagt fyri mentamálanevndina til støðutakan. Nevndin gjørdi somuleiðis vart við, at byggingin var viðbrekin, tí partur av grundøkinum er ogn hjá fransiskanarsystrunum, sum skuldu góðkenna uppskotið. Tí var uppskotið kanska dýrari enn líknandi bygging aðrastaðni. Somuleiðis hevur umhvørvið, skúlin og lendi ein dýrkandi leiklut.

Mentamálanevndin avgjørdi á fundi 4. apríl 2006 at senda verkætlanina út í øvutari lisitatión.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er í løtuni ikki til fyrimunar fyri hesum útbjóðingarhátti. Arbeiðstakarar hava ovmikið at gera. Hetta sæst ikki einans á teimum lisitatiónum, sum hava verið í seinastuni, men eisini tá ið arbeiðstakarar ítøkiliga verða spurdir, um áhugi er at bjóða upp á arbeiði eftir hesum leisti.

Av tí at arbeiðstakarar í Tórshavn ikki hava avvíst at bjóða upp á arbeiðið, men hava víst á, at hátturin er arbeiðskrevjandi, mælir bygginevndin og býararkitekturin til at broyta útbjóðingarháttin til høvuðsarbeiðstøku eftir prekvalifikatión, har tekniska umsitingin hevur møguleika at meta um hvønn einstakan arbeiðstakara við atliti at førleika, manning og fíggjarligum viðurskiftum.

Undanførleikametingin gevur grundarlag at bjóða arbeiðið út millum skikkaðar arbeiðstakarar antin í lisitatión, í undirhondsboði ella við samráðing alt eftir, hvussu nógvir arbeiðstakarar uppfylla minstukrøvini.

Ætlanin við undanførleikametingini er at staðfesta ítøkiligt, um áhugin hjá arbeiðstakaranum at bjóða er sakliga undirbygdur.

Til undanførleikametingina kann verða biðið um hesar upplýsingar:

1. Almenn lýsing av arbeiðstakaranum, so metast kann um kravda minstuorku bæði á tí fíggjarliga og á tí tekniska økinum.
2. Upplýsingar um fyriskipan og bygnaðin hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.
3. Váttan ella trúnaðarváttan, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
4. Avrit av viðkomandi vinnulívstryggingum.
5. Upplýsingar um eginogn og javna í roknskapi, tá ið søkt verður saman við einari váttan av samlaðu søluni hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
6. Váttan um árliga miðaltalið av fólki, sum starvast í fyritøkuni.
7. Ummæli frá líknandi uppgávum.
8. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkunum, ið verða knýtt at uppgávuni.
9. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.

**Tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum:**
Mælt verður til at taka undir við tilráðingini frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 1. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu beinanvegin.

**Býráðið 16. november 2006:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Hilduri Eyðunsdóttir um at taka undir við mentamálanevndini tann 1. november 2006, ið fall við 1 atkvøðu fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddi: Hildur Eyðunsdóttir

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Uppískoyti:**
Endalig góðkenning frá Náttúrufriðingarmyndugleikunum er ikki enn komin upp á pláss, men fyri at arbeiðið ikki skal draga út meira enn neyðugt, verður mælt til at projekteringin heldur áfram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mill. til projektering av útbjóðingartilfari til Sankta Frans skúla av íløgum fyri 2008.

**Mentamálanevndin 18. februar 2008:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Jan Christiansen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó so at peningurin ikki verður brúktur fyrr enn góðkenning frá náttúrufriðingarmyndugleikunum fyriliggur.

Ein minniluti, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**Lýsing av málinum:**
Fyri at arbeiðið við smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla kann halda fram, verður biðið um, at 3 mió. kr. í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2010 verða fluttar av íløgum hjá Eysturskúlanum til at fíggja framhaldandi projektering av smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla.

Í samband við umvælingarnar av Eysturskúlanum hevur mentamáladeildin umrøtt málið við Húsaumsitingina og skúlans leiðslu, og mett verður, at tær umvælingar, sum enn eru eftir at gera, kunnu bíða eina tíð.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 3 mió. kr. í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2010 verða fluttar av íløgum hjá Eysturskúlanum til at fíggja framhaldandi projektering v.m. av smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyri at byggja smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla var neyðugt at keypa lendið, sum var partur av matr.nr. 779a og matr.nr. 779b til skúlan. Kostnaðurin fyri keypið er kr. 288.561,67.

Samráðingar hava verið við eigaran av lendinum, sum hevur játtað at selja kommununi uml. 1.394 fermetrar av matr. nr. 779a, og uml. 705 fermetrar av matr. nr. 779b (tilsamans uml. 2.099 fermetrar). Eisini eru øll neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikunum og skógfriðingarnevndini fingin til vega. Prísurin, sum kommunan kann ogna sær lendi fyri liggur langt undir vanligan marknaðarprís.

Víst verður til fíggjarnevndarsamtykt 13. apríl 2005, sum tekur undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. apríl 2005 at fara undir at keypa økið matr.nr.779a og matr.nr.779b.

Gongdin í málinum hevur verið drúgv, m.a., tí at neyðugt var at fáa góðkenning frá friðingarmyndugleikunum til bygging á økinum, áðrenn lendið varð keypt. Haraftrat er tíð farin til frámatrikulering og samanlegging av ognum býráðsins til byggilendið.

Biðið verður um, at fíggjarnevndin játtar, at peningurin til keypið verður játtaður av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla, so keypið kann avgreiðast.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at kostnaðurin fyri keypið á kr. 288.561,67 verður játtað av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Ove Mortensen leggur verkætlanina fram og greiðir frá dispositiónsuppskoti og kostnaðarmeting. Dispositiónsuppskotið er lagað til, at forskúlin og frítíðarskúlin verða skipaðar sum eitt heildartilboð.

Umsitingin hevur saman við skúlanum tikið støðu til at broyta tilboðið frá einum forskúla og frítíðarskúla til eitt heildartilboð, sum er skipað við forskúla og frítíðarskúla. Hetta tí at mett verður, at gerandisdagurin hjá barninum verður tryggari og betri, tá forskúli og frítíðarskúli eru ein heild. Henda skipan skapar í størri mun møguleika at laga dagin eftir tørvinum hjá barninum, tí skilnaður millum skúla og frítíðarskúla verður ikki so eyðsýndur. Støðið eigur altíð at verða tikið í barninum og tí, sum tænir barninum best, her verður hugsað um menning, trivnað og læring.
Samanumtikið er endamálið við heildartilboðnum at geva barninum góðar menningarmøguleikar í tøttum samstarvi millum forskúla og frítíðarskúla.

Til projektering av smábarnaskúlanum, byggileiðslu og eftirlit verður biðið um, at 1.500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan til fólkaskúlan fyri 2010, undirkonto 4175 Dagføring av skúlum.

8. november 2006 samtykti fíggjarnevndin at bjóða arbeiðið út í høvuðarbeiðstøku. Støða er ikki tikin til, um arbeiðið skal bjóðast út í almennari ella innbodnari licitatión.
Tekniski stjóri mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla, at 1.500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan til fólkaskúlan fyri 2010 til projektering, byggileiðslu og eftirlit.

Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóra at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**265/09** **2007-2451**

**Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla**

7. september í 2004 samtykti mentamálanevndin (mál nr. 200402108) at heita á teknisku fyrisiting um at seta ein arbeiðsbólk at gera eina heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla.

Arbeiðsbólkurin við umboðum frá teknisku deild, mentamáladeildini og skúlan hevur síðani arbeitt við eini heildarætlan fyri skúlan. Partur av grundarlagnum fyri arbeiðinum var ein støðulýsing, sum húsaumsitingin hjá kommununi gjørdi í 2005 av øllum bygningunum hjá skúlanum. Steðgur kom í arbeiðið í 2006, tí ósemja var um grundleggjandi spurningar.

Síðani er avgjørt at byrja arbeiðið á nýggjum grundarlagi við broyttari arbeiðstilgongd.

Grundarlagið arbeitt verður á er - umframt støðulýsingin frá 2005 – avgerð mentamálanevndsins um ávíst hølisstøði, tá ið um- og útbyggingar verða gjørdar í skúlunum (mál nr. 2007-0504/3).

Fyrsta stigið í arbeiðstilgongdini er, at ein arkitektur skal gera forkanningar og síðani eitt yvirskipað skitsuuppskot um, hvussu framtíðar Kommunuskúlin kann síggja út og virka. Hetta skal gerast í samráð við allar viðkomandi partar. Í hesum sambandi er ein brúkarabólkur settur við umboðum fyri skúlan og ein tekniskur bólkur við umboðum fyri kommununa. Arbeiðs- og tíðarætlan er gjørd sum partur av sáttmálanum við arkitektin.

Miðað verður eftir, at yvirskipaða skitsuuppskotið um ársskiftið 2007/08 skal til politiska viðgerð. Síðani verður ein bygginevnd sett, og prosjektið koyrt víðari eftir mannagongdini fyri bygging hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniski stjórin kemur á fundin at leggja fram og greiða frá upplegginum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við upplegginum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan og at játta kr. 600.000 av íløgum á trivnaðarøkinum til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 27. august 2007:** Tekniski stjóri greiddi frá uppleggingum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan. Málið verður viðgjørt á fundi aftur týsdagin 28. august 2007, kl. 15.00.

**Fíggjarnevndin 29. august 2007:** Útsett.

**Mentamálanevndin 4. september 2007:** Nevndin tók undir við upplegginum um arbeiðstilgongd og tíðarætlan og mælir til at skúlin verður umboðaður í bygginevndini, tá ið hon verður sett.

Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 600.000 av íløgum á trivnaðarøkinum til arbeiðið.

**Fíggjarnevndin 5. september 2007:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 13. september 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Yvirskipað skitsuuppskot frá arkitekti og brúkarabólki verður lagt fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Árni Winther, arkitektur, greiddi frá heildarætlanini.

**Uppískoyti:**
Á íløguætlanini fyri 2009 er roknað við at játta kr. 4.000.000 til Tórshavnar Kommunuskúla. Hetta er tó ikki viðgjørt og samtykt í nevndum og býráðnum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 4.000.000 av íløguætlan 2009 til íløguætlan 2010 "Dagføring av skúlum" og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**266/09** **<u>2009-3106</u>**

**<u>Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**267/09** **<u>2009-2308</u>**

**<u>Badmintonhøllin – umvæling av tekju</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at Badmintonhøllin er yvirtikin av Tórshavnar kommunu, verður arbeitt við at gera stórar ábøtur á hana. Fyrsta arbeiðið, ið verður gjørt, er at steðgað lekunum í tekjuni. Hetta verður gjørt við at skifta hana út.

Ráðgevi hevur gjørt útbjóðingartilfar og innheintað tvinni undirhondsboð, tey eru hesi:

| | |
|---|---|
| Takplan | kr. 2.172.175,00 uttan mvg |
| Inntakt | kr. 1.324.965,00 uttan mvg |
| Undirhondsboð frá Inntakt | kr 1.324.965,00 |
| Óvæntað 10 % | kr 132.500,00 |
| Útreiðslur fyri útbjóðingartilfar | kr. 75.000,00 |
| Eftirlit | kr. 70.000,00 |
| Mvg 6,25 % | kr. 95.466,56 |
| | |
| Samlaðar útreiðslur | kr. 1.697.931,63 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til, at tikið verður av undirhondstilboðnum frá Inntakt og arbeiðið verður sett í gongd. Eisini verður mælt til, at kr. 1.697.000 verða játtaðar av kontu fyri íløgur til endamálið

**Mentamálanevndin 23. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. september 2009:** Einmælt samtykt.

**Uppískoyti:**
Á íløgum 2009 til Badmintonhøllina er eitt avlop, kr. 638.000,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamáleleiðarin mæla til at flyta kr. 638.000,00 av Íløgum 2009 til Badmintonhøllina 2010 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**268/09** **2009-3114**

**Viðvíkjandi hølisviðurskiftunum á Frítíðarskúlanum í Hornabø**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Síðani skúlaárið 2004/05 eru gjørdar fleiri fyribils loysnir og broytingar í Frítíðarskúlanum í Hornabø í sambandi við, at barnatalið støðugt er hækkað. Tí hevur tað verið neyðugt at leiga seg inn í ymisk onnur hølir. Í løtuni ganga áleið 90 børn úr 1. og 2. flokki í frítíðarskúlanum í Hornabø, sum umframt húsini í Hornabø, leigar Hansastovu á Háskúlanum og Spíran í Havnardali. Føroya Fólkaháskúli hevur sagt leigusáttmálan upp við kommununa 1. juli komandi ár.

Orsakað av at frítíðarskúlin í Hornabø heldur til í trimum ymiskum hølum, verður frítíðarskúlin dýrari at reka enn aðrir frítíðarskúlar í kommununi.

Umsitingin hevur leingi leitað eftir egnaðum hølum í vesturbýnum at savna allan frítíðarskúlan, men uttan úrslit. Umsitingin hevur tí vent sær til tekniska stjóran um møguleikan fyri at byggja uppí “Gulaskúla”. Umsitingin hevur eisini havt fund við skúlastjóran á Venjingarskúlanum, og metir hann, at hetta er eitt gott hugskot.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin fyri Børn og Ung mæla mentamálanevndini til at heita á teknisku deild at kanna, um til ber at byggja uppí "Gulaskúla" við Landavegin og fyrireika eitt prosjekt í hesum sambandi. Frítíðarskúlin skal kunna rúma fýra flokkum.

Harumframt mæla kommunustjórin og leiðarin fyri Børn og Ung mentamálanevndini til at flyta kr. 500.000 av kontu 599–3187 økt barnatal vegna umleggingar (2009) til prosjektkonto "Frítíðarskúli í Gulaskúla".

1 mill er sett av í 2009 til íløgur í nýggjan frítíðarskúla í Hornabø. Mælt verður til at flyta ta milliónina fram til fíggjarárið 2010.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**269/09** **2009-3064**

**Uppskot til raðfesting av íløgum fyri Fríðkan av býnum 2009**

**ÍLØGUÆTLANARUPPSKOT 2009**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Vísandi til langtíðaríløguætlanina eru fyri 2009, avsettar kr. 1,5 mió. til framhald av arbeiðinum uppá kirkjugarðin við Velbastaðvegin og kr. 800 tús. til fyrireiking og keyp av lendi til nýggjan kirkjugarð í Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á lendisdeildini mæla til at játta kr. 1.500.000,- til framhald av víðkanarætlanini á kirkjugarðinum við Velbastaðvegin og kr. 800 tús. til fyrireiking og keyp av lendi til nýggjan kirkjugarð í Kaldbak, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Maria Hammer Olsen

**270/09** **2006-3283**

**Brúgvin um Sandá**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Maria Hammer Olsen

**271/09** **2006-1754**

**Høvuðsprojekt: Sambindingarvegur Klingran-Løgmannabreyt við íbinding í**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina samlaða kostnaðarmeting álj. kr. 26.800.000,00 (sí skjal nr. 2006-1750/1) av øllum arbeiðinum at gera sambindingarveg millum Klingruna og Løgmannabreyt við rundkoyring á vegamótinum við Løgmannabreyt og yvir um komandi atkomuveg til Havnar, tó uttan gerð av planskyldari íbinding í komandi landsveg.

Kostnaður fyri projektering, útbjóðing og eftirlit er kr. 900.000,00.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir teknisku nevnd, umvegis figgjarnevndina og býráðið, til at játta kr. 900.000,00 til projektering, útbjóðing og eftirlit fíggjað av íløgum fyri vegir í 2006.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina í teknisku nevnd frá 1. juni 2006 um at játta kr. 900.000,00 til projektering, útbjóðing og eftirlit fíggjað av íløgum fyri vegir í 2006 sambært galdandi reglur um mannagongd um verkætlanir, sum skulu fíggjast av konto fyr íløgur.

Fíggjarnevndin skal viðgera uppskot til figging og til- ella frámæla.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Býarverkfrøðingurin greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út innan summarfrítíðina og at byrjað verður í september.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 3. juli 2006 viðgjørt fyriliggjandi høvuðsprojekt, sí tekningar j. nr. 2006-1413. Víst verður til fundarinnkalling og fundarfrásøgn nr. 3, sí j. nr. 2006-0260/9 og 10.

Sambært mannagond í sambandi við verkætlanir, sum skulu fíggjast av konto fyri íløgur, skal faknevndin góðkenna dispositiónsuppskotið, áðrenn bygginevndin kann fyrireika útbjóðing.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at staðfesta fyriliggjandi høvuðsprojekt, sí j. nr. 2006-1413 framlagt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd 4. juli 2006 og at bjóða arbeiðið út beinanvegin, sambært samtykt í teknisku nevnd 9. februar 2006, sí j. nr. 2005-1422/19.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2006**: Nevndin samtykti at taka undir við býarverkfrøðinginum.

**Tekniska nevnd 4. juli 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen, tekur ikki undir við verkætlanini.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 18. september 2006, kl. 14.00. Víst verður til tekningar j. nr. 2006-1413.

Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, sí skjal nr. 2006-2978/7.

Ráðgevin hevur gjørt eina tilráðing til teknisku deild og mælir til at taka upp samráðingar við p/f J & K Contractors, sí skjal nr. 2006-2978/8, um at gera arbeiðið "Sambindingarvegur Løgmannabreyt-Klingran við íbinding í landsveg".

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi kr. 29.600.000,00, sí skjal nr. 2006-1750/2, íroknað projektering, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og mvg grundað á alternativa tilboðið frá p/f J&K Contractors áljóðandi kr. 24.292.317,99.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka av tilboðnum frá p/f J&K Contractors, áljóðandi kr. 24.292.317,99, og fara undir realitetssamráðingar við felagið um ein sáttmála millum TK og p/f J&K Contractors, og at ráðgevin HMP-Consult ger eina arbeiðs- og tíðarætlan fyri arbeiðið saman við arbeiðstakaranum.

Býarverkfrøðingurin mælir eisini til at játta kr. 29.600.000,00 til arbeiðið av játtanini fyri íløgur til vegagerð.

**Tekniska nevnd 5. oktober 2006:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen, tekur ikki undir við verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og játta kr. 2.000.000 av íløgum í 2006, kr. 14.000.000 í 2007 og 13.600.000 í 2008.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Katrin Dahl Jakobsen.

- Umsitingin kunnar um byggi- og býarskipanarnevndina um verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

- Umsitingin og ráðgevin HMP Consult mæla til at taka upp samráðingar við arbeiðstakarin í sambandi við verkætlanina "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt við íbinding í landsveg" um at átaka sær arbeiðið at gera fyrireikingararbeiðið til brúgvalandfesti/fundamenti og brekka gongugøtu í skráan frá Sambindingarvegur og niðan á gongubrúnna við Stórutjørn og gera arbeiðið í somu arbeiðstøku.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
HMP Consult fer í gongd við at gera høvðusprojekt av gongubrúnni í nærmastu framtíð, men mett verður at brúk er fyri umleið kr. 500.000,- til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Nú arbeiðið er í gongd við at gera Sambindingarvegin, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at gera fyrireikingararbeiðið til brúgvalandfestið og gongugøtuna saman við arbeiðstøkuni at gera "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt við íbinding í landsveg".

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og fíggja arbeiðið við peningi, sum er settur av til óvæntaðar
útreiðslur í sambandi við "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt við íbinding í landsveg". Víst verður til fíggjarskjal, TK j. nr. 2006-1750/2. Um tað vísir seg at peningurin ikki røkkur til endamálið verður málið lagt fyri nevnd aftur, har biðið verður um eykajáttan.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 500.000,- til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til projektið sambindingarvegin Klingran. Peningurin er avsettur til væntaðar útreiðslur til prístalsregulering. Arbeiðstakarin hevur sett krav fram, sum umsitingin samráðist við hann um.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,-, til væntaðar meirútreiðslur í sambandi við endaliga uppgerð, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**272/09** **2009-4900**

**Játtanarreglur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2010.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Játtanarreglurnar áseta, hvørjar heimildir eru galdandi í sambandi við ársfíggjarætlanina.

Kommunustýrið hevur sambært §41 í kommunustýrislógini játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Ein játtan er ein heimild til at hava útreiðslur til eitt ávíst endamál ella inntøkur í samsvari við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Tað áliggur einari leiðslu, sum hevur fingið ávísingarheimild til eina játtan, umframt at fylgja galdandi reglum, at nýta játtanina skynsamt. Tað vil siga at halda útreiðslur og inntøkur í mun til tað virksemi, sum játtað er til.

Fíggjarætlanin verður samtykt á høvuðskontur. Tað vil siga, at eykajáttan krevst til flyting millum høvuðskontur. Flyting millum undirkontur skal góðkennast í avvarandi nevnd.
Sambært kommunustýrisskipanini skulu ávísar umbønir góðkennast í fleiri nevndum, Slíkar umbønir skulu eisini góðkennast í fíggjarnevndini.
Samlaði karmurin fyri høvuðskontuna skal haldast. Flyting av íløgujáttanum millum undirkonti skal góðkennast av býráðnum.

## Bruttojáttanir og nettojáttanir

**Bruttojáttan**
Játtanin er býtt í tveir bruttokarmar. Talan er um ein karm fyri útreiðslur og ein fyri inntøkur. Møgulig øking/minking í inntøkunum ávirkar tí ikki játtanina til útreiðslur.

**Nettojáttan**
Játtanin er ein nettokarmur. Talan er sostatt ikki um ein karm fyri útreiðslur og ein fyri inntøkur.

Møgulig øking/minking í inntøkunum ávirkar tí raksturin.

Sjálvt um játtanir sostatt á summum økjum verða givnar sum nettojáttanir, verða útreiðslur og inntøkur settar upp fyri seg í sundurgreinaðu ætlanunum.

## Serstakar ásetingar fyri einstøku játtanarsløgini

**Rakstrarjáttan**

Rakstrarjáttan verður nýtt, tá endamálið við játtanini serliga er ætlað at verða rokkið við kommunalum rakstrarvirksemi og at hava neyðugar útreiðslur í tí sam bandi, t.v.s. útreiðslur til starvsfólk, keyp av vørum og tænastum og til rakstur av bygningum v.m.

Í "Sundurgreinað ætlan" í viðmerkingunum er játtanin á høvuðskontuni sundurliðað í undirkontur og standardkontur. Henda sundurgreining er ikki bindandi.

Rakstrarjáttan er ein nettoútreiðslujáttan til tann ella teir stovnar, sum høvuðs-kontan fevnir um. Stovnurin kann hava rakstrarútreiðslur og -inntøkur samsvarandi viðmerkingunum til høvuðskontuna. Meirinntøkur geva rætt til at hava samsvarandi meirútreiðslur.

**Íløgujáttanir**

Í fíggjarætlanini eru íløgujáttanirnar settar á høvuðskontu og undirkontu. Ein undirkonta kann hava fleiri verkætlanir.

Hvør einstøk verkætlan skal samtykkjast eina ferð í býráðnum. Skal íløgujáttan flytast millum høvuðskontur, skal tað viðgerast sum eykajáttan, t.v.s. tvær ferðir í býráðnum.

Játtanir kann vera  yvir fleiri ár.

Íløgujáttanir eru altíð bruttojáttanir, t.v.s. ein játtan til útreiðslur og ein til inntøkur.

Væntandi meirnýtsla í sambandi við einstakar verkætlanir skal leggjast fyri býráðið við umbøn um hægri játtan. Er neyðugt at hækka ella flyta játtanina millum høvuðs-konti, skal tað viðgerast sum eykajáttan.

Er verkætlanin yvir fleiri ár og játtan er tøk árið eftir, og samlaða játtanin heldur, verður meirnýtslan flutt fram og viðgjørd sum eykajáttan.

Við ársenda ger tekniska fyrisitingin eitt yvirlit yvir verkætlanir, sum eru í gongd og lokaðar verkætlanir. Yvirlitið verður lagt fyri nevndirnar og fíggjarnevndina.

Ikki nýtt játtan til verkætlanir, sum eru í gongd, verður flutt til næsta fíggjarár við eykajáttan.

Avlop av lokaðum verkætlanum fellur aftur til høvuðskontoina. Ein treyt er, at verkætlanin er gjørd upp og eftirmett í avvarandi nevnd.

Víst verður til serligar "politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við verkætlanir". Arbeitt verður í løtuni við einari nýggjari reglugerð viðv. løgujáttanum.

**Onnur játtan**
Onnur játtan verður nýtt í serligum føri, tá játtanarendamálið er ætlað at verða rokkið við at veita stuðul, ella tá talan er um inntøkur, sum ikki eru natúrliga knýttar at rakstrar- og løguvirkseminum.

## Framflytingar

Grundreglan er, at framflytingar kunnu gerast sambært niðanfyri standandi ásetingum:

**Meirnýtsla**
Rakstrarjáttan:
Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av brutto– ella nettojáttanini, alt eftir hvat slag av játtan talan er um, verður flutt til næsta ár. Meirnýtslan eigur at vera burtur, innan trý ár eru farin.

**Minninýtsla**
Rakstrarjáttan:
Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av brutto– eller nettojáttanini, alt eftir hvat slag av játtan talan er um, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski tí er um at flyta meiri enn 10% til árið eftir, kann ein avtala gerast um hetta við avvarðandi deild og fíggjardeildina.

Onnur játtan:
Framflytingar kunnu ikki gerast av Onnur játtan, tó undantikið 5370 Stuðul til íløgur, har einki mark er fyri upphæddini.

## Ábyrgd

**Ábyrgd og fráboðanarskylda**
Deildar- og stovnsleiðarar, sum hava fingið ávísingarheimild til eina játtan, hava ábyrgd av, at nýtslan ikki fer upp um fíggjarætlanina.

Um fíggjarætlanin ikki kann haldast, áliggur tað stovnsleiðsluni beinanvegin at boða avvarðandi fyrisiting frá.

**Eykajáttan**
Umbønir um eykajáttanir verða viðgjørdar í avvarðandi nevnd, fíggjarnevndini og tvær ferðir í býráðnum**. Tað er bert býráðið, sum hevur heimild til at veita eykajáttanir,** og merkir tað, at virksemi ikki verður sett í verk, fyrr enn eykajáttan er fingin til vega.

Umbøn um flyting millum høvuðskontur skal viðgerast á sama hátt sum eykajáttan, meðan flyting millum undirkontur kann avgerast í viðkomandi nevnd. Tó má samlaði karmurin fyri høvuðskontuna haldast.

## Serligar reglur

**8311 og 8375 Nýkeyp og útskifting av amboðum**
Stjórnin leggur uppskot um útskiftingar og nýkeyp komandi fíggjarár, fyri fíggjarnevndina til góðkenningar, , Tað er ikki neyðugt við góðkenning í býráðnum.

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til at góðkenna uppskotið til játtanarreglur fyri 2010.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

273/09 **2009-1489**

**Ellis- og røktarheim yviri við Strond**

Føroya Løgting hevur 30. apríl 2009 samtykt nýggja lóg um studningslán til bygging av ellis- og røktarheimum. Nú kunnu kommunurnar fáa upp til 50% av byggikostnaðinum, tó í mesta lagi 700.000 kr. pr. búfólk. Løgtingslógin áleggur Almannaráðnum at viðgera umsóknirnar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum.

Tørvurin á røktarheimsplássum í Suðurstreymi fer sambært hagtalsmetingum hjá Hagstovuni helst at økjast í framtíðini. Sum er, eru 145 persónar visiteraðir til eldrabústovn. Av teimum hava um leið 75 ein bráðneyðugan tørv.

Í sambandi við at lógin um studningslán er lýst og sett í gildi hevur Almannamálaráðið við skrivi til Kommunusamskipan Føroya, dagfest 28. mai 2009 heitt á kommununar um innan 1. juli 2009 at koma við umsóknum um stuðul. Umsóknirnar verða viðgjørdar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum og við fakligari ráðgeving frá ávikavist Nærverk og Landsverk.

Fyri at taka eitt munagott stig, sum eisini tryggjar framtíðar tørv, meta samgonguflokkarnir, at kommunan eigur at byggja røktarheim í Tórshavn við 64 búplássum yvir tvey ár treytað av, at landsstýrið veitir stuðul til helvtina av byggikostnaðinum umframt at tryggja raksturin.

**Sosiala nevnd 9. juni 2009:** Ásannandi stóra tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í Suðurstreymi samtykkir sosiala nevnd at mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndini til, at søkja landsstýrið um studningslán til at byggja

røktarheim við 64 búplássum á økið, kommunan hevur ognað sær til endamálið Yviri við Strond.

Samstundis verður heitt á umsitingina um at gera byggiskrá til røktarheim við 64 búplássum Yviri við Strond, og at játta 200.000 kr. til endamálið av íløgum á trivnaðarøkinum ætlað eldraøkinum í 2009.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 25. juni 2009:** Eimælt samtykt.

**Nýtt:**
Við skrivi, dagfest 13. oktober 2009, hevur Almannamálaráðið boðað frá, at landsstýriskvinnan í almannamálum hevur gjørt av at geva kommununi tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 44,8 mió. kr. til 64 búpláss.

**Sosiala nevndin 20. oktober 2009:** Nevndin varð kunnað um málið og at Albert Isfelt og Gudmund Hansen, arkitektar, hava fingið arbeiðið at gera byggiskrá

**Ískoyti:**
Ì samband við útbjóðing av arbeiðinum at projektera og byggja nýtt røktarheim Yviri við Strond, skal støða takast til útbjóðingarhátt. Málið er viðgjørt í arbeiðsbólkinum, sum borgarstjórin hevur sett at fyriskipað ger av byggiskránni. Vísandi til stuðulstilsøgnina frá landsstýrinum, svarandi til kr. 700.000 pr. búpláss, metir arbeiðsbólkurin at miðjast skal eftir at byggja røktarheimið fyri ein prís so tætt uppá 1,4 mió. pr. búpláss, sum til ber. Arbeiðsbólkurin metir, at størstu sannlíkindini eru fyri at røkka hesum, við at bjóða arbeiðið út í umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka. Hesin útbjóðingarháttur krevur, at avgerð verður tikin um samsýning til tilboðsgevarar, hvør mannar dómsnevndina, og hvørji viðurskifti verða løgd til grund fyri avgerð um hvat tilboð kommunan velur.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin mælir í hesum sambandi til fylgjandi:

1. At upp til 5 tilboðsgevarar verða útvaldur við eini pre-kvalifikatión har ásett verða krøv til tekniskan og fíggjarligan førleika, royndir, góðskutryggingarskipanir o.l. krøv, sum umsitingin lýsir.
2. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari, umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka, millum teir útvaldu tilboðsgevararnar, ið eru prekvalifiseraðir.
3. At samsýningin til tilboðsgevararnar verður upp til 150.000 pr. uppskot og annars sambært ásetingunum í ABT93, men tó soleiðis, at endaliga samsýningin verður útroknað eftir í hvønn mun innlatin tilboð lúka krøvini í byggiskránni.

4. At dómsnevndin verður mannað við bygginevndini og býararkitektinum. Harumframt kunnu limirnir í arbeiðsbólkinum og onnur fakfólk virkað sum ráðgevarar hjá dómsnevndini.
5. At tilboðini verða mett út frá hesum fortreytum:

| **Evni** | **Vekt í %** | **Stigatalva 1 - 9** | **Stig tilsamans** | **Vektaði prosentstig** |
|---|---|---|---|---|
| Arkitekturur | 20% | | | |
| Funktionalitetur | 20% | | | |
| Tilfar/góðska | 15% | | | |
| Tilboðsupphædd | 20% | | | |
| Samsvar við byggi-skránna (v. fleiri undirpunktum) | 25% | | | |
| | 100% | | | |

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur móttikið byggiskránna og tekur fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Til verkætlanina eru játtaðar kr. 200.000,- til ger av byggiskrá. Eftir á íløguætlanini á eldraøkinum fyri 2009 eru kr. 1.390.700,-

Við fyrivarni fyri møguligum smærri tillagingum mælir arbeiðsbólkurin til at góðkenna byggiskránna, og at fyribils verða játtaðar kr. 1.390.000,- til verkætlanina til m.a. at fíggja jørðkanningar, samsýning til tilboðsgevarar og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Við fyrivarni fyri møguligum smærri tillagingum í byggiskránni mæla kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, og at játtaðar verða kr. 1.390.700 av íløgum á eldraøkinum fyri 2009.

**Sosiala nevnd 16. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**274/09** **2009-3026**

**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2010**

Uppskot frá umsitingini til fundadagar:

| | |
|---|---|
| 28. januar | 24. juni |
| 25. februar | 16. september |
| 18. mars | 21. oktober |
| 22. apríl | 18. november |
| 20. mai | 16. desember |

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**275/09** **2008-4231**

**Val av býráðslimi í bygginevndina Útstykking Myllutjørn sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 17. desember 2009:** Valdir vórðu Levi Mørk og Jan Christiansen.

**276/09** **2009-0387**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 17. desember 2009:** Tikið til eftirtektar.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |